B Ú S K A P A R R Á Ð I Ð

# BÚSKAPARFRÁGREIÐING

VÁRIÐ 2011

2 8 .   F E B R U A R   2 0 1 1

# INNIHALDSYVIRLIT

1. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI ........ 4
2. LÝSING AV FISKIVINNUNI ........ 6
2.1 Inngangur ........ 6
2.2 Týdningurin av fiskivinnuni fyri búskapin ........ 7
2.2.1 Støddin á fiskivinnuni í búskapinum sum heild ........ 7
2.2.2 Gjaldsjavnin og útflutningur av vørum ........ 7
2.2.3 Tøknilig menning og fiskivinnan ........ 8
2.2.4 Fiskivinnan í Íslandi og Noregi ........ 9
2.2.5 Niðurstøða ........ 10
2.3 Vánaligt lønsemi í heimaflotanum ........ 10
2.3.1 Raksturin síðan 1999 ........ 10
2.3.2 Betri gongd í fjarfiskiflota og fiskaaling ........ 13
2.3.3 Veiðin síðstu árini ........ 13
2.3.4 Niðurstøða ........ 17
3. BROYTTA FISKIVINNUSKIPAN ........ 18
3.1 Inngangur ........ 18
3.2 Stutt um verandi fiskivinnuskipan ........ 19
3.2.1 Loyvisskipanin – grundarlagið undir fiskivinnuskipanini ........ 19
3.2.2 Forðingar fyri kapping og produktivitetsvøkstri ........ 25
3.2.3 Krøv til landing ........ 26
3.2.4 Lønarskipanin ........ 27
3.2.5 Fiskivinnan og økispolitikkur ........ 27
3.3 Tilmæli til broytingar ........ 28
3.3.1 Flyta ásetingina av fiskidøgum úr politisku skipanini ........ 28
3.3.2 Selja fiskirættindi á uppboðsølu ........ 29
3.3.3 Strika forðingar fyri kapping og fríari tillaging ........ 30
3.3.4 Samanumtikið ........ 30
4. KONJUNKTURMETING ........ 31
4.1 Heildarmeting ........ 31
4.2 Búskaparlig útlit ........ 33
4.2.1 Seinasta konjunkturgongdin ........ 33
4.2.2 Framrokning av BTÚ ........ 34
4.2.3 Altjóða búskaparútlit ........ 36
4.3 Geirarnir í búskapinum ........ 37
4.3.1 Tað almenna ........ 37
4.3.2 Húsarhaldini ........ 38
4.3.3 Tilfeingisvinnurnar ........ 39
4.3.4 Fíggjargeirin ........ 42
4.3.5 Aðrar vinnur ........ 43
4.3.6 Útlond ........ 45

# BÚSKAPARRÁÐIÐ

Búskaparráðið gevur við hesum út konjunkturfrágreiðingina, sum eftir løgtingslóg nr. 50 frá 11. mai 2009 um Búskaparráð skal koma út tvær ferðir um árið.

Valskeiðið hjá hesum Búskaparráðnum er trý ár og seks mánaðir frá 1. juli í 2009 at rokna. Búskaparráðið hevur til uppgávu at fylgja við búskaparligum viðurskiftum í landinum og at koma við óheftari búskaparligari ráðgeving og frágreiðingum um búskaparligu gongdina. Tað er ásett í lógini fyri Búskaparráðið, at tað skal gera tvær konjunkturfrágreiðingar árliga, sum verða almannakunngjørdar 1. mars og 1. september.

Frágreiðingin hesa ferð fevnir um eina lýsing og meting av nøkrum trupulleikum og skeivleikum í okkara fiskivinnuskipan umframt eina dagførda meting av konjunkturstøðuni.

Skrivarauppgávan hjá Búskaparráðnum er við avtalu løgd til Landsbanka Føroya at taka sær av.

Limir ráðsins eru:

Thomas Dam, *cand.merc, formaður*

Durita Tausen, *cand.scient.oecon*

Gunn Danielsen, *cand.polit*

Skrivari hevur verið:

Tórir Michelsen, *cand.polit*

# 1. SAMANDRÁTTUR OG TILMÆLI

Fiskivinnan týðandi lykil at tryggja varandi búskaparvøkstur Verða tillagingar og broytingar gjørdar, soleiðis at fiskiveiðan verður burðardygg, fæst ein meira lønandi vinna eftir fáum árum. Við betri lønsemi í fiskivinnuna ber eisini til at fáa hægri búskaparvøkstur sum heild næstu árini. Skulu avbjóðingarnar við stórum bygnaðarligum halli á fíggjarlógini verða loystar, er alneyðugt við búskaparvøkstri næstu árini. Fiskivinnan er helst týdningarmiklasti lykilin.

Veiðitrýstið óforsvarliga høgt Veiðitrýstið undir Føroyum hevur síðstu 15 árini verið umleið 50-70% hægri enn tað veiðitrýst, sum hevði givið mest búskaparliga og lívfrøðiliga. Størsta forðingin fyri búskaparligum avkasti í fiskivinnuni er, at fiskiveiðan undir Føroyum verður ikki stýrd á burðardyggan hátt.

Heimliga fiskivinnan havt vánaligan rakstur í fleiri ár Heimliga fiskivinnan og fiskavirkisvinnan hava havt sera trupult at fáa lønsemi í raksturin í fleiri ár. Feskfiskiveiða, t.e. fiskiveiða eftir botnfiski undir Føroyum, hevur at kalla ikki givið avlop síðani 2002, og undir einum, hevur fiskatilvirking ikki givið avlop síðani 2001.

Frítt fiskarí Meginparturin av fiskiskapinum undir Føroyum er í veruleikanum *frítt fiskarí* (verður sæð burtur frá stongdum leiðum), og er tí ikki burðardyggur. Hetta sæst greidliga av, at hóast fiskidagarnir í fiskidagaskipanini eru skerdir umleið 35%, síðani skipanin byrjaði, er stórur partur av døgunum óbrúktur ár um ár, samstundis sum veiðitrýstið síðstu árini hevur verið alt ov høgt – serliga eftir toski og hýsu. Tí er tørvur á at broyta fiskivinnuskipanina, m.a. við tí endamáli at stýra fiskiveiðuni burðardygt.

Neyðugt við grundleggjandi broytingum Fyri at stýra fiskiveiðuni burðardygt, er neyðugt við grundleggjandi broytingum. Fleiri teirra ber til at seta í verk beinanvegin.

Lat óheftan stovn regulera fiskiveiðina undir Føroyum Tilmælini eru t.d. at flyta ásetingina av fiskidøgum úr politisku skipanini og í staðin geva óheftum stovni uppgávuna av at áseta teir, soleiðis at lívfrøðiliga og búskaparliga fæst sum mest burturúr. Í staðin skal Løgtingið áseta veiðisetning fyri fiskiveiðuna undir Føroyum, t.e. reglugerð fyri, hvussu nógv loyvt ella ráðiligt er at fiska úr fiskastovnum (*catch control rule*). Løgtingið skal eisini fyri mest týðandi fiskasløgini, sum verða fiskað í føroyskum sjógvi, áseta ætlan, sum orðar mannagongd og tilskilar kravd stig fyri at verja stovnar, verða fiskastovnar so mikið smáir og illa fyri, at vandi er fyri, at teir ikki megna at endurnýggja seg (*recovery plan*).

Taka av stuðulsskipanir og forðingar Eisini verður mælt til at taka av almennar stuðulsskipanir til fiskivinnuna og at strika forðingar fyri kapping og fríari tillaging.

Luta út nýggj rættindi á uppboði ella áseta tilfeingisgjald Búskaparráðið hevur áður víst á møguleikan at luta út fiskirættindi á uppboði. Hetta kann við fyrimuni verða brúkt tá ið nýggjur fiskiskapur tekur seg upp í føroyskum sjógvi ella aðrastaðni í millumlandasamstarvi. Á henda hátt kunnu vit fyrireika okkum og fáa virðismiklar royndir, áðrenn nýggj skipan skal verða sett í verk í 2018.

Dømi um tílíkan fiskiskap er makrelfiskiskapurin í føroyskum sjógvi. Uppboðssøla hevði tryggjað, at tey effektivastu skipini stóðu fyri fiskiskapinum, og at landskassin sum umboð fyri eigaran, Føroya fólk, fekk lut í tilfeingisrentuni. Ber hetta ikki til í 2011, kann í staðin tilfeingisgjald verða tikið í eini skiftistíð fyri tær kvotur, ið verða lutaðar út.

Makrelur kann avreiðast fyri 7-8 kr./kg. í miðal. Siga vit, at kvotan í 2011 verður 100 tús. tons, verður avreiðingarvirðið á makrelinum 700-800 mió. kr. Tilfeingisgjald til landskassan á t.d. 2 kr./kg. hevði givið 200 mió. kr.

Útlit til at fiskivinnan kann kasta nógv av sær í framtíðini Verður rætt borið at, soleiðis at tillagingar verða gjørdar og umsitið verður við tí endamáli at fáa burðardygga fiskiveiðu, hevur vinnan góðar møguleikar at gerast lønandi.

Konjunkturstøðan BTÚ í ársins prísum í 2010 kann metast at vaksa umleið 1%. Undir ávísum fyritreytum eru eisini útlit til búskaparvøkstur í 2011 og nøkur ár aftaná. Grundað á myndilin hjá Landsbankanum verður vøksturin í 2011 og 2012 mettur at vera um 5% í miðal. Nakað av óvissu er um vøksturin í BTÚ fyri 2011 orsakað av, at ein av stóru bankunum, Eik Banki, er í eini tilgongd við eigaraskifti, sum kann ávirka útlánsvirksemið hjá bankanum í ár. Framleiðslan í fiskivinnuni í 2011 verður møguliga ávirkað av húsaganginum í Faroe Seafood. Harafturat kemur, at framleiðslan í fiskivinnuni býtt á skipabólkar broytist orsakað av ósemjuni millum strandalondini um makrelfiskiskapin.

Útlit eru til búskaparvøkstur í 2011 og 2012 Vøksturin í 2010 stavar frá meiri framleiðslu í fiskivinnuni og frá hallinum í almenna geiranum. Vøksturin í 2011 og 2012 stavar frá, at framleiðslan í fiskivinnuni væntandi fer at vaksa orsakað av frægari fiskiskapi eftir botnfiski undir Føroyum, umframt at útflutningurin av alifiski væntandi fer at vaksa. Harafturat er sannlíkt, at privata nýtslan aftur hækkar á eina meira vanliga legu. Vøksturin verður hinvegin helst tálmaður av, at tað almenna (land og kommunur) væntandi táttar nakað í fíggjarpolitiskt fyri at minka hall í almenna geiranum.

Privata nýtslan er framvegis lítil Húsarhaldsnýtslan er framvegis lítil, um borið verður saman við nýtsluna síðstu nógvu árini, og húsarhaldini brúka í løtuni ein lutfalsliga lítlan part av inntøkuni til nýtslu. Hetta ávirkar búskapin á tann hátt, at eftirspurningurin eftir vørum og tænastum er undir miðal. Harafturat eru tekin um, at vinnulívið ger fáar (ný)íløgur í løtuni (taltilfar er ikki tøkt at vísa á hetta greitt).

Arbeiðsloysið í løtuni umleið 7% Arbeiðsloysið hækkaði nógv orsakað av einum einstakum húsagangi í desember 2010 (Faroe Seafood), sum gjørdi, at 400-500 fólk gjørdust arbeiðsleys. Sæð burtur frá hesari einstaku hending, hevur arbeiðsloysið verið at kalla óbroytt síðani á sumri 2010. Hildið verður, at arbeiðsloysið kann lækka aftur niður á 5-6% seinri í ár. Serliga eru útlit til hetta, tá ið virksemi aftur verður á nøkrum av virkjunum í búnum eftir Faroe Seafood, um ikki á øllum. Miðalarbeiðsloysið í 2011 kann tískil gerast umleið 6%.

# 2. LÝSING AV FISKIVINNUNI

## 2.1 INNGANGUR

Seinastu nógvu árini hevur tann parturin av fiskivinnuni, sum roynir í føroyskum sjógvi, havt hall av rakstrinum.[1] Lutvíst er hetta orsakað av viðurskiftum, sum eru trupul at gera nakað við, t.d. olju- og fiskaprísir. Lutvíst er hetta eisini orsakað av, at altjóða búskaparkreppan rakar vinnur meinast, sum frammanundan eru viðbreknar. Men ein orsøk er eisini, at okkara fiskivinna grundleggjandi ikki er skipað soleiðis, at hon kann geva størst møguligt búskaparligt avkast.

Búskaparráðið er sannført um, at við tillagingum og broytingum, soleiðis at fiskiveiðin verður burðardygg, ber til at fáa eina meira lønandi vinnu eftir fáum árum. Soleiðis kann fiskivinnan geva enn størri íkast til føroyska samfelagsbúskapin, enn hon ger nú. Við at fáa betri lønsemi í fiskivinnuna ber eisini til at fáa hægri búskaparvøkstur sum heild næstu árini. Havandi í huga hallið tilsamans í almenna geiranum og tær avbjóðingar, ið vera av hesum, er greitt, at hesar avbjóðingar verða lættari at loysa, um vit fáa hægri búskaparvøkstur næstu árini.

Føroysk fiskivinna hevur, verður hon umsitin á skilagóðan og burðardyggan hátt, møguleikar at kasta nógv av sær í framtíðini. Yvirhøvur eru góð útlit til búskaparvøkstur í Ásia, Eysturevropa, Russlandi og Suðuramerika. Hetta ger, at ein skjótt vaksandi fjøld av brúkarum fer at eftirspyrja dygdargóðar mat- og fiskavørur í Evropa og á øðrum nýggjum marknaðum. Fyritreytin fyri at fáa sum mest úr hesum møguleikum er, at fiskivinnan verður umskipað til eina burðardygga vinnu, sum kann fáa besta prísin fyri sína framleiðsluna.

Eins og greitt verður frá aðrastaðni, ávirkast fiskiskapurin og raksturin hjá vinnuni av fleiri ymsum viðurskiftum, harav myndugleikar bara kunnu ávirka nøkur teirra í ávísan mun. Kortini kunnu myndugleikar í fyrra lagi stilla veiðitrýstið lívfrøðiliga og búskaparliga rætt (t.e. burðardygt). Í øðrum lagi kunnu karmarnir um vinnuna leggjast soleiðis til rættis, at vinnan fær tillagað seg og kappast frítt eins og aðrar vinnur, ið virka eftir marknaðarligum treytum.[2]

*Fiskivinna* kann býtast í fleiri bólkar, og ójavnt er, hvussu raksturin hevur verið seinastu árini. Tríggir høvuðsbólkar eru t.d. fiskiveiði í føroyskum sjógvi, botnfiskiveiði á fjarleiðum og fiskiveiði eftir uppsjóvarfiski á nær- og fjarleiðum.[3] Bygnaðurin í hesum bólkum er ymiskur, og fyritreytirnar eru ymiskar til ymiskar tíðir. Seinastu árini er tað serliga heimliga fiskivinnan, sum hevur havt trupult at fáa lønsemi í raksturin.

---

[1] Roknskaparuppgerð hjá Hagstovu Føroya vísir t.d., at feskfiskaveiði gav hall árini 2007 og 2008. Feskfiskaveiði svarar á leið til tann partin av flotanum, sum roynir eftir botnfiski í føroyskum sjógvi. Sambært vinnuni sjálvari og roknskapargreining hjá grannskoðarafelagnum NOTA vóru úrslitini eisini vánalig í 2009, og 2010 verður væntandi heldur ikki eitt gott ár hóast kanska eitt sindur frægari enn 2009. Samanumtikið bendir alt á, at heimaflotin hevur hall av rakstrinum øll árini 2007-2010. Fiskivinnan á landi, fiskavirking, hevur havt hall øll árini 2002-2010.

[2] Gjøllari verður greitt frá aðrastaðni í frágreiðingini, t.d. í 2.3.3 og 3.1, hvat tað í hesum føri merkir at stilla veiðitrýstið búskaparliga og lívfrøðiliga rætt.

[3] Afturat hesum bólkum eru eisini aðrir bólkar, t.d. fiskaaling, frítíðarfiskiskapur og fiskivinnan á landi, t.e. fiskavirking, sum allir kunnu bólkast undir *fiskivinnu*.

## 2.2 TÝDNINGURIN AV FISKIVINNUNI FYRI BÚSKAPIN

Týdningurin av fiskivinnuni fyri búskapin verður her lýstur í stuttum. Dentur verður lagdur á tvey fyribrigdi. Í fyrra lagi er størsti parturin av okkara útflutningi fiskur og fiskavørur. Í øðrum lagi eigur fiskivinnan stóran lut í tí búskaparvøkstri, sum hevur verið í Føroyum seinastu øldina. Tøknilig menning og betri veiði- og vinnutól hava gjørt, at í dag veiða væl færri fiskimenn somu nøgdir av fiski sum í tíðini eftir seinna heimsbardaga. Arbeiðsmegi er tí blivin tøk at arbeiða í øðrum vinnum á landi. Hetta hevur havt stóran búskaparvøkstur við sær og gjørt, at lívskorini støðugt eru batnað í Føroyum í tíðini eftir seinna heimsbardaga.

Týdningurin av fiskivinnuni fyri búskapin kann lýsast við fleiri ymsum fyribrigdum og tølum. Niðanfyri verður í stuttum víst á virðisøkingina í búskapinum, gjaldsjavnan og útflutning umframt á týdningin av tøkniligari menning. Onnur viðurskifti, t.d. týdningurin av fiskivinnuni fyri stutttíðarsveiggj í búskapinum, verða ikki viðgjørd her.

### 2.2.1 Støddin á fiskivinnuni í búskapinum sum heild

Mynd 2.1 vísir fiskiveiði og fiskavirking sum part av *bruttovirðisøkingini* í føroyska búskapinum. Bruttovirðisøkingin er í stuttum søluvirðið á framleiddu vøruni í eini vinnu frádrigið keyp av tilfari til framleiðsluna frá øðrum vinnum. Mynd 2.1 vísir tí, at fiskiveiði fevndi um umleið 7% av føroyska búskapinum í 2009, og at fiskavirking fevndi um umleið 6% av føroyska búskapinum.

Bruttovirðisøking eftir høvuðsvinnum, % og mia. kr. ársins prísir, 1998-2009 MYND 2.1




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Gongdin sum víst í mynd 2.1 er, at fiskivinnan er blivin minni partur av búskapinum. Búskapurin er vaksin umleið 60% síðan 1998 (í ársins prísum), og hetta er hent, *hóast* fiskivinna er minkað sum partur av búskapinum. Minkingin kemur av tøkniligari menning, sum ger, at færri fiskimenn við færri og effektivari vinnutólum kunnu veiða somu nøgdir av fiski. Harvið verður arbeiðsmegi tøk at arbeiða í øðrum vinnum á landi. Á mynd 2.1 sæst eisini, at tað serliga eru tænastuvinnur, sum eru vaksnar síðani 1998.

### 2.2.2 Gjaldsjavnin og útflutningur av vørum

Meginparturin av føroyska útflutninginum er sum kunnugt fiskur, fiskavørur og alifiskur. Mynd 2.2 vísir tann partin av vøruútflutninginum tilsamans, sum stavar frá fiskivinnuni (t.e. fiskur og fiskavørur, alifiskur ikki íroknaður).

Á myndini sæst, at seinastu nógvu árini hevur umleið 70% av føroyska vøruútflutninginum verið fiskur og fiskavørur, alifiskur ikki íroknaður. Árini 2008 til 2010 hevur lutfallið verið lægri, um 60%, sum mest er orsakað av stóra vøkstrinum í útflutningi av alifiski.

Gjaldsjavnin fevnir um vørur, tænastur og inntøku- og rakstrarflytingar til útlond og úr útlondum. Inntøkur til Føroyar frá útlondum stava tí frá útflutningi av vørum og frá útflutningi av tænastum, frá inntøkuflytingum (t.e. lønarflytingar og inntøkur frá ognum) og frá rakstrarflytingum (ríkisveitingin úr Danmark).

Útflutningur av fiski og fiskavørum í % av vøruútflutningi tilsamans — MYND 2.2




**Viðm.:** Alifiskur er ikki íroknaður í fisk og fiskavørur.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Talva 2.1 vísir høvuðsbólkarnar av inntøkum á gjaldsjavnanum árini 2005-2008. Sum talvan vísir, stavaðu í 2009 umleið 34% av inntøkunum til Føroyar úr útlondum frá fiskivinnuni.[4] Í 2010 var talið helst á áleið sama stigi. Meira varð útflutt av alifiski í 2010, og prísirnir á alifiski vóru sera góðir, men meira varð eisini útflutt av botn- og uppsjóvarfiski. Luturin hjá fiskivinnuni í inntøkunum til Føroyar úr útlondum tykist sum heild at vera fallandi.

Inntøkur á gjaldsjavnanum, mió. kr. — TALVA 2.1

| Høvuðsbólkar | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vørur og tænastur | 4.719 | 4.398 | 4.224 | 4.410 | 4.905 | 5.224 | 5.628 | 5.220 |
| -Vørur | 4.261 | 3.938 | 3.707 | 3.618 | 3.869 | 4.057 | 4.346 | 4.098 |
| --Harav útflutningur av fiski og fiskavørum | 3.219 | 2.800 | 2.714 | 2.868 | 3.169 | 3.229 | 2.599 | 2.277 |
| -Tænastur | 458 | 460 | 517 | 792 | 1036 | 1167 | 1283 | 1122 |
| Inntøkuflytingar | 723 | 727 | 626 | 934 | 1036 | 1009 | 937 | 623 |
| Rakstrarflytingar | 912 | 871 | 908 | 913 | 977 | 1275 | 879 | 932 |
| Inntøkur úr útlondum tilsamans | 6.354 | 5.996 | 5.758 | 6.257 | 6.918 | 7.508 | 7.444 | 6.775 |

**Kelda:** Hagstova Føroya.

### 2.2.3 Tøknilig menning og fiskivinnan

Í løtuni eru umleið 1.800 løntakarar skrásettir í fiskiveiði og umleið 1.700 løntakarar í fiskavirking. Í 1990 vóru umleið 2.700 løntakarar í fiskiveiði og umleið 3.000 í fiskavirking. Í 1960 vórðu umleið 4.000 fiskimenn skrásettir at vera mynstraðir við føroyskum skipum og bátum.[5] Harafturat koma tey, sum hava arbeitt við at tilvirka fisk á landi. Í 1960 var

[4] 2.277 mió. kr. av 6.775 mió. kr.

[5] Kelda: [9].

fólkatalið umleið 32.000, so helst hevur umleið 40% av arbeiðsmegini arbeitt í fiskivinnuni í tíðini eftir seinna heimsbardaga.

Nøgdirnar av veiddum og tilvirkaðum fiski eru ikki minkaðar hetta tíðarskeiðið, hóast talið á løntakarum í fiskivinnuni er minkað - tvørturímóti.[6] Hetta er orsakað av tøkniligari menning, sum hevur givið fiskivinnuni effektivari vinnutól, sum kunnu veiða og tilvirka somu nøgdir av fiski við færri arbeiðsfólki. Harvið er hópurin av arbeiðsmegi blivin tøkur til aðrar vinnur á landi, sum hevur havt búskaparvøkstur og betri lívskor við sær fyri allar føroyingar. Mynd 2.3 vísir løntakarar í fiskiveiði og fiskavirking sum partur av øllum løntakarum til samans. Myndin vísir, at yvirhøvur arbeiðir ein minkandi partur av arbeiðsmegini í fiskivinnuni.

Løntakarar í fiskiskapi og fiskavøruídnaði, 12 mánaðar miðal — MYND 2.3




**Kelda:** Hagstova Føroya.

### 2.2.4 Fiskivinnan í Íslandi og Noregi

Í Noregi og Íslandi hevur fiskivinnan – eins og í Føroyum – spælt ein týðandi leiklut í samfelagnum alla tjúgundu øld. Sum partur av búskapinum til samans er fiskivinnan tó ikki eins stór í hesum báðum grannalondunum. Í Noregi er fiskivinnan bert ein viðfáningur av búskapinum, meðan hon er nakað størri í Íslandi men kortini væl minni partur enn í Føroyum. Mynd 2.4 vísir fiskivinnuna sum partur av bruttovirðisøkingini, og myndin kann berast saman við mynd 2.1 omanfyri.

Bruttovirðisøking býtt á vinnugreinar í % av tilsamans, Ísland og Noreg — MYND 2.4




**Kelda:** Hagstofa Íslands og Statistisk centralbyrå.

---

[6] Heildarveiðan eftir toski undir Føroyum lá støðugt millum 20.000 og 40.000 tons alla 20. øld sæð burtur frá seinna heimsbardaga og stóra fallinum í veiðini fyrst í 1990'unum, sí [18] og [10].

Av tí at fiskivinnan er lutfalsliga stórur partur av okkara búskapi, hevur tað stóran týdning, at okkara fiskivinna verður umsitin soleiðis, at hon kann geva størst møguligt búskaparligt avkast. Støðan er ein onnur Íslandi og heilt ein onnur í Noregi. Av tí at teirra búskapur er minni tengdur at fiskivinnuni, hevur tað ikki sama týdning fyri lívskorini til samans í Noregi, um fiskivinnan har lutvíst hevur til endamáls at røkka økispolitiskum endamálum, heldur enn at geva størst møguligt búskaparligt avkast.

Somu møguleikar við fiskivinnuni hava vit ikki í Føroyum, uttan at hetta ávirkar lívskorini í landinum sum heild. Tí skal ein vera varin við at bera saman fiskivinnuna í Føroyum við fiskivinnu í Íslandi og Noregi. Sammetingargrundarlagið er ikki rætt, tí fiskivinna hevur ikki sama búskaparliga týdning í okkara grannalondum. Í Føroyum hava vit ikki ráð at lata fiskivinnuni geva hall ár um ár og at umsita hana soleiðis, at hon ikki gevur størst møguligt búskaparligt avkast.

### 2.2.5 Niðurstøða

Fiskivinnan eigur stóran lut í tí búskaparvøkstri, sum hevur verið í Føroyum í tjúgundu øld. Tøknilig menning hevur gjørt, at færri fiskimenn kunnu veiða somu nøgdir av fiski við færri og effektivari vinnutólum, sum hevur gjørt, at arbeiðsmegi er blivin tøk til aðrar vinnur á landi.

Fiskivinna (fiskiveiði og fiskavirking) er vorðin minni partur av búskapinum síðstu árini úr omanfyri 20% í 1998 til umleið 10% í 2009. Umleið 60% av vøruútflutninginum er fiskur og fiskavørur, meðan umleið 35% av inntøkunum til Føroyar úr útlondum til samans stava frá fiskivinnuni. Fiskivinnan hevur ikki sama búskaparliga týdning í okkara grannalondum sum hjá okkum.

## 2.3 VÁNALIGT LØNSEMI Í HEIMAFLOTANUM

Sum nevnt í innganginum hevur tann parturin av flotanum, sum roynir í føroyskum sjógvi, í fleiri ár havt trupult at fáa lønsemi í raksturin. Sum víst verður á niðanfyri hevur fiskiveiði í føroyskum sjógvi mestsum ikki givið nakað avlop árini 2003-2010.

### 2.3.1 Raksturin síðan 1999

#### *2.3.1.1 Feskfiskiveiði*

Mynd 2.5 vísir úrslit áðrenn óvanligar postar fyri feskfiskiveiði árini 1999 til 2008 (og metingar fyri 2009 og 2010). Sum myndin vísir, er raksturin versnaður nógv hesi árini. Sambært vinnuni gav raksturin eisini hall í 2009,[7] og 2010 verður heldur ikki eitt gott ár, hóast tað helst verður heldur frægari enn 2009. Samanumtikið hevur heimaflotin til samans havt hall av rakstrinum øll árini 2007-2010. Mynd 2.5 vísir eisini, at yvirhøvur hevur avlopið av feskfiskiveiði verið sera lítið øll árini 2003-2010.

[7] Roknskapargreining hjá grannskoðarafelagnum NOTA frá november 2010, [14], vísti t.d., at teir tríggir skipabólkarnir línuskip, partrolarar og lemmatrolarar høvdu hall av rakstrinum í 2009 á tilsamans meiri enn 45 mió. kr.

Ársúrslit og úrslit áðrenn óvanligt fyri feskfiskaveiði MYND 2.5




* Tølini fyri 2009 og 2010 eru leysligar metingar um gongdina og skulu tí verða lisin við fyrivarni.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Støðan í heimligu fiskivinnuni er tekin um, at grundleggjandi skeivleikar eru í okkara fiskivinnuskipan, sum gera tað trupult hjá vinnuni at fáa lønsemi í raksturin. Vánaliga støðan í heimligu fiskivinnuni eigur at verða tikin í álvara og er eitt høvi hjá myndugleikum (løgtingi og landsstýri) at gera grundleggjandi broytingar í fiskivinnuskipanini og í karmunum um vinnuna.

Vánaligu úrslitini síðan 2003, sí mynd 2.5, eru sum nevnt omanfyri úrslit av fleiri viðurskiftum; m.a. skiftandi olju- og fiskaprísum og skiftandi fiskiskapi. Mynd 2.6 vísir gongdina í miðalprísinum á toski 1 og toski 2 skrásettur í avreiðingarskipanini. Myndin vísir, at fiskaprísir (í øllum føri prísirnir á toski) hava yvirhøvur verið støðugir síðstu umleið 10 árini – sæð burtur frá einstakum prísfallum, sum hava verið í styttri tíð.

Miðalprísir á toski 1 og toski 2 skrásettur í avreiðingarskipanini MYND 2.6




**Kelda:** Hagstova Føroya.

Havandi í huga mynd 2.6 eru fiskaprísir ikki størsta orsøkin til vánaligu gongdina í fiskivinnuni síðstu árini, sum hon er lýst her. Var fiskivinnan ein búskaparliga burðardygg og lønandi vinna, hevði hon verið ment at konsolidera seg í góðum tíðum, soleiðis at hon hevur eginpening at standa ímóti við, skuldu óvæntaðir stoytir ávirkað raksturin.

Mynd 2.7 vísir gongdina í eginogn og skuld til samans í feskfiskaveiði. Myndin vísir, at skuldin hjá heimaflotanum er vaksin nógv síðan 1999, meðan eginognin hevur verið meira støðug, men at hon er fallin nógv síðan 2007. Eginognin hevur yvirhøvur verið fallandi síðan 2002. Vaksandi skuldin hjá flotanum er m.a. avleiðing av, at fiskiskip og –dagar, veiði- og fiskiloyvi eru keypt og seld. Vaksandi skuld í heimaflotanum nýtist í sær sjálvum

ikki at vera ein trupulleiki fyri flotan, men hetta er sjálvsagt treytað av at raksturin er búskaparliga haldførur. Við meiri skuld verður raksturin meira viðbrekin, um óvæntaðir stoytir koma fyri.

Eginogn og skuld tilsamans í feskfiskaveiði, 1999-2010 MYND 2.7




* Tølini fyri 2009 og 2010 eru leysligar metingar um gongdina og skulu tí verða lisin við fyrivarni.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

### 2.3.1.2 Fiskavirki á landi

Fiskavirki á landi hava síðstu nógvu árini havt torført at fáa lønsemi í raksturin. Mynd 2.8 vísir ársúrslit og úrslit áðrenn óvanligt og skatt fyri fiskavirking. Skuld tilsamans sæst eisini í myndini. Sum myndin vísir, hevur raksturin givið hall øll árini síðan 2001. 2009 var eisini eitt vánaligt ár fyri fiskavirkini, og havandi í huga støðuna í Faroe Seafood, verður 2010 eisini eitt vánalig ár.

Ársúrslit, úrslit áðrenn óvanligt og skuld tilsamans, fiskavirking, 1999-2010 MYND 2.8




* Tølini fyri 2009 og 2010 eru leysligar metingar um gongdina og skulu tí verða lisin við fyrivarni.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Fiskavirkini fevna um mong ymisk sløg av virkjum, harav fleiri teirra hava avlop av rakstrinum. Av tí at virkini eru so ymisk og av tí at eitt teirra (P/F Faroe Seafood) er sera stórt sammett við hini, skulu niðurstøður fyri øll virkini útfrá roknskapargreiningum gerast við fyrivarni. Høvuðsgongdin síðstu árini hevur verið, at smærru og sjálvstøðugu fiskavirkini hava havt góðan og lønandi rakstur, meðan størru fiskavirkini hava havt sera trupult at fáa lønsemi í raksturin.

## 2.3.2 Betri gongd í fjarfiskiflota og fiskaaling

Úrslitini hjá tí partinum av flotanum, sum roynir eftir botnfiski á fjarleiðum og uppsjóvarfiski – t.e. fyrst og fremst flakatrolarar í m.a. Barentshavinum og nótaskipini - hava verið munandi betri enn hjá heimaflotanum seinastu nógvu árini.

Mynd 2.9 vísir ársúrslit og úrslit áðrenn óvanligt og skatt fyri fjarfiskiflotan til samans[8] og fiskaaling árini 1999-2008 (umframt metingar fyri 2009 og 2010). Sum heild hava úrslitini verið góð fyri fjarfiskiflotan í fleiri ár, og fyri fiskaaling hava úrslitini eisini verið góð øll árini síðan kreppuna árini 2002 til 2004. Fjarfiskiflotin og fiskaaling verða ikki viðgjørd gjølliga her, men tekin eru um, at tær vinnurnar hava karmar at virka innan, sum betri loyva búskaparligum avkasti sammett við umstøðurnar fyri heimaflotan.

Ársúrslit og úrslit áðrenn óvanligt, fjarfiskiflotin og fiskaaling, 1999-2010 — MYND 2.9




**Viðm.:** Fjarfiskiflotin fevnir her um verksmiðju- nóta- og rækjuskip.
* Tølini fyri 2009 og 2010 eru leysligar metingar um gongdina og skulu tí verða lisin við fyrivarni.
**Kelda:** Hagstova Føroya.

Ein av orsøkunum til góðu úrslitini í fjarfiskiflotanum seinastu nógvu árini er, at fiskastovnar, sum uppsjóvarskipini royna eftir, hava verið hart troyttir undanfarin ár. Avleiðingin sæst lutvíst í, at uppsjóvarvinnan hevur heldur verri fiskiskap og rakstur nú enn áður (tó at 2010 sambært vinnuni verður eitt gott ár, sum m.a. stavar frá makrelfiskiskapinum í føroyskum sjógvi).

## 2.3.3 Veiðin síðstu árini

Mynd 2.10 vísir heildarveiðina eftir toski, hýsu og upsa á Landgrunninum. Sum myndirnar vísa, er veiðin eftir toski og hýsu sera lítil í løtuni, áleið á sama stigi sum fyrst í 1990'unum. Tað er trupult at gera nakað við fiska- og oljuprísir, rentustigið og natúrligu gróðrarumstøðurnar í sjónum. Fiskiskapurin ávirkast av nógvum ymsum viðurskiftum,[9] harav myndugleikar bara kunnu ávirka nøkur teirra í ávísan mun.

Politiski myndugleikin kann tó taka stig til at stilla veiðitrýstið (fiskadeyðan) soleiðis, at veiðitrýstið yvir tíð í miðal svarar til tilgongdina til fiskastovnin og vøksturin í stovninum. Politiski myndugleikin kann v.ø.o. avmarka atgongdina til tilfeingið soleiðis, at fiskadeyðin í miðal yvir tíð ikki er størri enn natúrliga framleiðslan av t.d. toski, soleiðis at stovnurin ikki minkar yvir tíð. Í hesum sambandi er merkisvert, at eingin veiðisetningur (*catch control rule*) er ásettur fyri fiskiveiðina undir Føroyum, annað enn lívfrøðiliga atlitið í lóg um

[8] Fjarfiskiflotin fevnir í hesum sambandi um verksmiðju-, nóta- og rækjuskip.

[9] Sí [18], har hetta er betri lýst.

vinnuligan fiskiskap. Heldur eingin *recovery plan* er ásett fyri fiskiveiðina undir Føroyum, um gýtingarstovnar verða somikið smáir og illa fyri, at vandi er fyri, at teir ikki megna at endurnýggja seg.

Heildarveiða, toskur, hýsa og upsi undir Føroyum og mett veiða 2010-2011 MYND 2.10




**Viðm.:** Tølini fyri 2010 og 2011 eru mett veiða av ICES.
**Kelda:** ICES, úr [10].

Í øðrum lagi vísa vísindaligar kanningar, at natúrliga framleiðslan av t.d. toski er størst, tá ið stovnurin er stórur og væl fyri, tí hetta førir til ta størstu langtíðartilgongdina. Tí loysir tað seg best lívfrøðiliga og búskaparliga at halda t.d. toskastovnin stóran.[10] Sostatt kunnu vit ikki gera nógv við fiska-, oljuprísir og rentuna, men vit kunnu gera nakað við nøgdirnar, sum vit fiska og við tann kostnað vit nýta til endamálið, t.e. við tann veiðikapasitet vit nýta í fiskiskapinum.

### *2.3.3.1 Ov høgt veiðitrýst*

Orsøkirnar til vánaliga fiskiskapin eftir toski og hýsu undir Føroyum síðstu nógvu árini eru lutvíst, at natúrligu gróðrarumstøðurnar undir Føroyum vóru undir miðal í nøkur ár fyrst í hesi øldini. Somu tíð var veiðitrýstið alt ov høgt, soleiðis at í miðal er meira fiskað úr stovnunum, enn teir natúrliga megna at framleiða av tilgongd og vøkstri. Hetta hevur ført til, at stovnarnir eru minkaðir. Natúrliga framleiðslan er tí eisini minkað, tí at natúrliga framleiðslan hjá toskastovninum er minni, tá ið stovnurin er lítil og illa fyri.[11]

Grundarlagið undir eini nýggjari fiskivinnuskipan verður tí ein skipan, sum kann tryggja eitt lívfrøðiliga burðardygt veiðitrýst frameftir. Tað er altavgerandi fyri eina búskaparliga haldføra fiskivinnuskipan, at hon eisini er lívfrøðiliga burðardygg. Gongdin í fiskiskapinum, veiðitrýstinum og í rakstrinum í heimligu fiskivinnuni og í fiskavirkisvinnuni síðstu árini vísir týðuliga, at verandi skipan ikki megnar hesa høvuðsuppgávuna. Politiska

[10] Sí [18].

[11] Sí [8], [16], [18] og [7], har nærri er greitt frá hesum.

myndugleikanum og vinnuni tørvar tí onnur amboð ella aðra skipan at tryggja, at veiðitrýst og fiskiskapur eru lívfrøðiliga og búskaparliga burðardygg.

Eitt fyribrigdi, sum sæst týðuliga á mynd 2.10 er, at sveiggini í heildarveiðini eftir toski og hýsu undir Føroyum hava verið nógv størri síðstu 20-25 árini sammett við tíðina fyri hetta. Myndin vísir t.d., at heildarveiðin eftir toski minkaði niður á 6-7.000 tons tvær ferðir í hesum tíðarskeiði, sum ikki er komið fyri áður. Hetta er sambært fiskifrøðingum tekin um, at veiðitrýstið síðstu 20-25 árini hevur verið ov høgt, soleiðis at fiskastovnarnir eru minkaðir, og harvið er natúrliga framleiðslan hjá stovnunum minkað.[12]

Sambært kanningum hevur veiðitrýstið undir Føroyum síðstu 15 árini verið umleið 50-70% hægri enn tað veiðitrýst, sum hevði givið mest lívfrøðiliga og búskaparliga.[13] Í seinastu stovnsmeting av toskastovninum á Landgrunninum varð toskastovnurin (t.e. tvey ár og eldri) mettur til umleið 33 tús. tons.[14] Sambært útrokningum hjá fiskifrøðingum er *optimala* stovnstøddin fyri toskastovnin á Landgrunninum (t.e. tann stovnstøddin, sum hevði givið mest lívfrøðiliga) umleið 100 tús. tons. Tá hevði avkastið av toskastovninum verið umleið 25% í miðal um árið, ella umleið 25 tús. tons høvdu kunnað verið veidd.[15] Sjálvsagt er hetta við natúrligum sveiggjum um miðaltalið orsakað av sveiggjum í natúrligu gróðrarumstøðunum undir Føroyum.

Ein annar skeivleiki í okkara fiskivinnuskipan er, at ov nógvur smáfiskur sambært fiskifrøðingum verður fiskaður inni við land, sum er uppvakstrarøkið hjá toski og upsa. Hetta er ikki skilagott búskaparliga. Við at lata toskin blíva nakað eldri, heldur enn at fiska hann 3-4 ára gamlan, fæst munandi meira virði úr toskinum. Toskur veksur skjótast eftir umleið 3 ára aldur.

Toskafiskiskapur býtt á bólkar og støðd í %, 1. mai 2009 til 30. apríl 2010 — TALVA 2.2

| Bólkur | Toskur 1 | Toskur 2 | Toskur 3 | Toskur 4 | Toskur 5 |
|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1 | 6 | 5 | 3 | 1 | 1 |
| Bólkur 2 | 23 | 23 | 11 | 3 | 2 |
| Bólkur 3 | 49 | 39 | 26 | 21 | 16 |
| Bólkur 4A | 2 | 2 | 3 | 4 | 5 |
| Bólkur 4B | 4 | 5 | 12 | 16 | 18 |
| Bólkur 4T | 6 | 7 | 11 | 9 | 12 |
| Garnaskip | 1 | 1 | 0 | 0 | 0 |
| Bólkur 5A* | 6 | 12 | 21 | 27 | 28 |
| Bólkur 5B* | 4 | 7 | 12 | 17 | 18 |
| Tilsamans | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

* Fiskiskapurin í bólki 5A og 5B til egna nýtslu, t.e. sum ikki er avreiddur vinnuliga, er ikki við í talvuni.
**Kelda:** Fiskidaganevndin, [5].

Í lóg um vinnuligan fiskiskap er heimilað landsstýrismanninum í kunngerð at gera reglur um vernd av ungfiski.[16] Havstovan og fiskidaganevndin hava í fleiri umførum mælt til, at eingin vinnuligur fiskiskapur við húki og troli verður loyvdur nær landi (t.d. innanfyri

[12] Sí t.d. eisini [18], [8] og [16].

[13] Sí t.d. [8] og [18].

[14] Sí [10].

[15] Sí [18].

[16] Lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 9, stk. 1.

tríggjar fjórðingar) fyri at verja yngstu árgangirnar av serliga toski og upsa. Talva 2.2 omanfyri vísir, at fyri at minka um veiðina eftir serliga smáum toski verður neyðugt at gera nakað við veiðina hjá bólkunum 4B, 4T og bólki 5. Hesir bólkar standa fyri stórum parti av veiðini eftir smáfiski.

Í hesum sambandi skal eisini viðmerkjast, at fiskiskapurin til egna nýtslu hjá bólkunum 5A og 5B, t.e. sum ikki verður avreiddur vinnuliga, er ikki vístur í talvu 2.2, og tí er fiskiskapurin eftir smáfiski hjá hesum bólkum óivað *størri* enn talva 2.2 vísir. Í bólki 5A eru 68 fiskiloyvi, og í 5B eru 628 fiskiloyvi, ella út við 700 smábátar til samans, og tilsamans eru umleið 13 tús. dagar í bólki 5 (fiskiárið 2009/10). Seinastu trý fiskiárini hava verið brúktir umleið 50% ella færri av tillutaðu døgunum í bólki 5. Fiskiárið 2007/08 vóru 124 fiskiloyvi í bólki 5A og 356 fiskiloyvi í bólki 5B. Munurin millum bólkarnar er, hvussu nógva inntøku teir hava av fiskiskapi og soleiðis, um teir hava rætt til minstaforvinning. Tað eigur at verða viðgjørt politiskt, um tað er rætt at lata summum mestsum fría atgongd til hesa ískoytisvinnu úr okkara felags tilfeingi.

### *2.3.3.2 Gongdin í veiðikapasiteti*

Veiðitrýstið[17] er m.a. treytað av veiðikapasitetinum í fiskiflotanum. Veiðikapasitetur er torførur at gera upp í tølum, men er treytaður av m.a. talinum á fiskiførum, tonsatalinum á fiskiflotanum til samans og av tøkniligari menning, sum fer fram í øllum vinnutólum. Hetta merkir, at fiskiskip yvir tíð verða effektivari og fáa meira veiðikapasitet. Tí er neyðugt at tillaga talið á fiskiførum og tonsatalið so hvørt, soleiðis at veiðikapasiteturin ikki veksur meira enn stovnarnir tola av veiðikapasiteti.

Talva 2.3 vísir talið á veiðiloyvum størri enn 15 tons í fiskidagaskipanini. Talvan vísir, at til samans er talið á veiðiloyvum minkað 35% síðan 1995. Talva 2.3 vísir greitt, at umsetiligheitin í skipanini hevur ávirkað talið á fiskiførum í flotanum, og at vinnan sjálv í ávísan mun hevur tillagað seg. Tað er serliga í bólki 4A, 4B og 4T, at veiðiloyvini eru minkað, meðan tað eru blivin fleiri veiðiloyvi í bólki 3, sum eru línuskip yvir 110 tons. Síðstu trý árini er talið á veiðiloyvum í bólki 3 minkað aftur. Veiðikapasiteturin hjá einum línuskipi í bólki 3 er sjálvsagt nógvar ferðir størri enn veiðikapasiteturin hjá einum útróðrarbáti í bólki 4A ella 4B. Tí er trupult at siga, um ella hvussu nógv veiðikapasiteturin er minkaður grundað á tølini í talvu 2.3.

Tal á veiðiloyvum størri enn 15 tons, býtt á bólkar — TALVA 2.3

| Bólkur | 1995 | 2008 | 2011 | Broyting 1995 til 2011 | %-broyting |
|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 1, lemmatrolarar | 14 | 13 | 10 | -4 | -29 |
| Bólkur 2, partrolarar | 34 | 28 | 26 | -8 | -24 |
| Bólkur 3, línuskip | 19 | 25 | 20 | 1 | 5 |
| Bólkur 4A, útróðrarbátar, 15-40 tons | 50 | 22 | 21 | -29 | -58 |
| Bólkur 4B, útróðrarbátar størri enn 40 tons á línuveiðu | 35 | 22 | 22 | -13 | -37 |
| Bólkur 4T, útróðrarbátar størri enn 40 á trolveiðu | 19 | 17 | 12 | -7 | -37 |
| Tilsamans | 171 | 127 | 111 | -60 | -35 |

* Í 2005 varð gjørd ein umbólking, so at øll fiskifør yvir 110 tons sum royna við línu, vórðu flokkað í bólk 3, og tey undir 110 tons vóru verandi í bólki 4. Hetta bar í sær, at seks línuskip vóru flutt úr bólki 4B upp í bólk 3.

**Kelda:** Fiskivinnustovan og úr [21].

[17] Veiðitrýst merkir her lutfallið millum veiði (fiskadeyða) og stovn; t.e. tann parturin av stovninum, sum hvørt ár verður veiddur ella tikin úr stovninum. Talið á fiskiskipum, húkum, veiði- og fiskiloyvum ella fiskimonnum sigur tí einki í sær sjálvum um veiðitrýstið.

Uppgerð hjá Fiskiveiðieftirlitinum yvir tillutaðar og brúktar dagar býtt á fiskiskip síðstu árini vísir, at fleiri fiskiskip fáa tillutaðar dagar, men brúka bara lítlan part av døgunum. Tí eru øll veiðiloyvini, víst í talvu 2.3, í veruleikanum ikki virkin. T.d. eru í løtuni umleið 18 línuskip virkin sambært vinnuni, hóast talið á veiðiloyvum er hægri.

### 2.3.4 Niðurstøða

Støðan er yvirhøvur vánalig í heimligu fiskivinnuni. Hetta er galdandi fyri feskfiskiveiði (t.e. vinnuna á sjónum) og fyri fiskavirki á landi (størri virki hava vánaligan rakstur, men smærri virkini hava yvirhøvur góðan og lønandi rakstur). Raksturin í feskfiskiveiði hevur givið hall øll árini 2007-2010, og hevur mestsum ikki givið avlop øll árini 2003-2010, sí mynd 2.5). Fiskavirkini hava havt sera torført at fáa lønsemi í raksturin í fleiri ár og hava til samans havt hall øll árini 2002-2010. Fjarfiskiflotin hevur havt betri úrslit síðstu árini, sæð burtur frá 2008 og lutvíst eisini 2009. Fiskaaling hevur eisini havt góð úrslit øll árini, eftir at vinnan var í kreppu fyri nøkrum árum síðan.

Raksturin hevur verið ymiskur býtt á skipabólkar og feløg innan heimligu fiskivinnuna og fiskavirkisvinnuna. Fyri allan heimaflotan til samans er støðan tó somikið álvarslig, at politiski myndugleikin (løgting og landsstýri) eigur at taka støðuna í álvara og taka stig til at broyta okkara fiskivinnuskipan.

Tað er skilagott javnan at gera vinnukarmar betri og at kanna eftir, um teir eru lagaðir til tíðina og umstøðurnar, soleiðis at vinnur kunnu geva størst møguligt búskaparligt avkast. Í næsta partinum av frágreiðingini verður nevnt í stuttum hvørjar broytingar og atlit eiga at verða umhugsað í hesum sambandi útfrá einum búskaparligum sjónarmiði.

# 3. BROYTTA FISKIVINNUSKIPAN

## 3.1 INNGANGUR

Gongdin í fiskivinnuni síðstu árini vísir, at karmarnir um fiskivinnuna eru ikki av slíkum slag, at fiskivinna kann geva størst møguligt búskaparligt avkast. Størsti trupulleikin fyri fiskivinnuna er, at hon ikki er lívfrøðiliga burðardygg. Ein fyritreyt fyri at fáa størst møguligt búskaparligt avkast úr vinnuni er, at hon er lívfrøðiliga burðardygg.

Sum víst verður á í hesum partinum av frágreiðingini er meginparturin av fiskarínum undir Føroyum í veruleikanum *frítt fiskarí* (á teimum leiðum, har loyvt er at fiska), og tí eru grundleggjandi broytingar neyðugar í fiskivinnuskipanini fyri at gera hana lívfrøðiliga burðardygga. Tað er eisini merkisvert, at eingin veiðisetningur (*catch control rule*) er ásettur fyri fiskiveiðina, annað enn lívfrøðiliga atlitið í lóg um vinnuligan fiskiskap. Heldur eingin *recovery plan* er ásett fyri fiskiveiðina undir Føroyum, um stovnar gerast somikið smáir, at vandi er fyri, at teir ikki megna at endurnýggja seg.

Høgi miðalaldurin á heimaflotanum er eisini tekin um vánaligu støðuna í heimaflotanum.[18] Heimaflotin hevur ikki verið mentur at endurnýggja seg síðstu mongu árini, sum er tekin um vánaliga lønsemið í vinnuni. Heimliga fiskivinnan hevur heldur ikki verið før fyri at konsolidera seg í góðum tíðum, soleiðis at hon hevur nakað av eginogn at standa ímóti við í verri tíðum.

Harafturat kunnu vit vænta, at trýstið frá brúkarum um umhvørvismerkingar (t.d. MSC-merkingar) o.a. um, at fiskur skal verða veiddur á burðardyggan hátt, fer at vaksa í framtíðini. Hetta er trýst á okkum uttanífrá, sum vit ikki fáa gjørt nógv við, men sum fer at seta krøv til okkara fiskivinnuskipan. Sæð úr okkara sjónarmiði er skilagott at laga okkara fiskivinnuskipan til hetta trýst frá brúkarum um burðardygd, tí hetta merkir, at fiskivinnufyritøkur fáa best møguligan prís fyri veiðina.

Politiski myndugleikin eigur tí saman við áhugabólkum í vinnuni, Føroya Reiðarafelag, manningarfeløgum og framleiðslu- og søluliðinum á landi, fíggingarstovnum og serfrøði á viðkomandi økjum at taka stig til at broyta verandi fiskivinnuskipan. Í fyrsta lagi eigur hetta at fevna um at stilla veiðitrýstið lívfrøðiliga og búskaparliga rætt, soleiðis at veiðitrýstið (fiskadeyðin) í miðal ikki er størri enn fiskastovnarnir framleiða av vøkstri og tilgongd. Í øðrum lagi kunnu karmarnir um vinnuna skipast soleiðis, at vinnan fær virkað og kappast frítt eftir marknaðarligum treytum, eins og aðrar vinnur.

Niðanfyri verður víst á fleiri fyribrigdi í verandi fiskivinnuskipan, sum forða vinnuni at virka frítt og forða fyri fríari tillaging. Harafturat eru forðingar fyri kapping, umframt tað fyribrigdið, at fiskirættindi verða ikki lutað út eftir marknaðarligum treytum. Alt hetta tálmar produktivitetsvøkstri í vinnuni. Skal fiskivinnan frameftir geva størst møguligt búskaparligt avkast, er neyðugt, at tílíkar avmarkingar verða strikaðar.

Fyri at fiskivinnan støðugt skal hava best møguligar karmar at virka innan er neyðugt javnan at endurskoða og tillaga fiskivinnuskipanina. Tað kann vera, at fleiri av

---

[18] Miðalaldurin á línuskipum er t.d. um 40 ár, miðalaldurin á garnaskipum er yvir 40 ár, meðan lemma- og partrolarar eru nakað yngri men tó yvir 20 ár í miðal. Kelda: Fiskiveiðieftirlitið og www.teyggjan.fo.

fyribrigdunum í okkara fiskivinnuskipan vóru hóskilig miðskeiðis í 1990'unum, men tað er ikki vist, at skipanin er tíðarhóskandi og í samsvari við tørvin í dag.

## 3.2 STUTT UM VERANDI FISKIVINNUSKIPAN

Fiskivinnan er á fleiri hættir skipað øðrvísi enn aðrar vinnur og hevur fleiri avmarkingar, forðingar fyri kapping og almennar stuðulsskipanir at dragast við, sum aðrar vinnur ikki hava. Sum víst verður á niðanfyri, eru t.d.:

- Forðingar fyri, at fyritøkur kunnu leggja saman, m.a. ognaravmarkingar, og harvið fáa fyrimunir av stórrakstri (tilvildarlig %-mørk fyri mest loyvdan eigaraskap av fiskirættindum eftir lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 7a, stk. 1.).

- Forðingar fyri útlendskum ognarparti (í mesta lagi 1/3 útlendskur ognarpartur er loyvdur umframt krav um fast tilknýti til Føroyar o.s.fr. eftir lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 7.).

- Forðingar fyri umsetiligheit. Treytin fyri at kunna avhenda fiskidagar er t.d., at 60% av døgunum, fiskiárið frammanundan, eru nýttir til fiskiskap. (Endamálið var at forða fyri, at feløg fáa útskrivað fiskiloyvi bert fyri at avhenda til onnur. Við tí fyrivarni, at veiðitrýstið ikki veksur av hesum, kann forðast fyri hesum við at áseta eina greiða brúksskyldu á øll útlutað fiskirættindi, soleiðis at tey fara úr gildi og fella aftur til landið, um tey ikki verða nýtt eitt ávíst tíðarskeið.).

- Ásetingar um skipabólkar í fiskidagaskipanini. Bólkabýtið forðar fyri fríari tillaging og fyri fríari kapping. Bólkabýtið var kanska hóskandi, tá ið fiskidagaskipanin kom, men um hugt verður eftir, hvussu stórur partur av døgunum verður nýttur, býtt á skipabólkar, tykist tíðin vera farin frá fleiri av bólkunum.

- Forðingar fyri, at fiskur kann tilvirkast umborð á skipum, sum royna undir Føroyum. Undantøk kunnu gerast frá hesi regluni, men skipanin er ósmidlig og forðar fyri fríari tillaging. Lóg um vinnuligan fiskiskap hevur frá byrjan av lagt upp til, at skip skulu ikki tilvirka fiskin umborð, og eitt úrslit av hesum er, at fiskifør undir Føroyum eru (við fáum undantøkum) ikki útgjørd at frysta fisk umborð o.s.fr.

- Forðingar fyri, at fiskur kann verða avreiddur uttanlands, sum landsstýrismaðurin kann áseta reglur um eftir lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 9, stk. 4.

- Almennar stuðulsskipanir til fiskivinnuna, t.d. sjómannafrádráttur, fiskavirkisskipanin, MVG-undantøk, undantøk í brennioljuavgjaldinum og tað at fiskivinnan fær ókeypis atgongd til tilfeingið. Talan er um almennar stuðulsskipanir, sum halda uppi yvirkapasiteti og forða fyri, at vinnan fær kappast frítt á marknaðarligum treytum eins og aðrar vinnur. Harvið minka stuðulsskipanirnar um lønsemið og produktivitetsvøksturin í vinnuni.

### 3.2.1 Loyvisskipanin – grundarlagið undir fiskivinnuskipanini

Sum kunnugt og ólíkt framleiðslu- og tænastuvinnum er fiskivinnan ein *tilfeingisvinna*. Við tað at tilfeingið (fiskastovnarnir) er avmarkað í støðd, samstundis sum veiðikapasiteturin

samanlagt er størri, enn fiskastovnarnir tola av veiðitrýsti, er neyðugt hjá tí almenna at avmarka atgongdina til tilfeingið. Loyvisskipanin má tí vera avmarkandi. Loyvi til at reka vinnuligan fiskiskap kann ikki latast øllum, men nøkrum.

### *3.2.1.1 Loyvisskipanin má vera avmarkandi*

Søguliga sæð er tørvurin á at avmarka atgongdina til tilfeingið komin í tíðini eftir seinna heimsbardaga. Eftir seinna heimsbardaga hevur tøkniliga menningin í vinnutólum verið somikið stór, at veiðikapasiteturin til samans er blivin størri enn fiskastovnarnir tola av veiðitrýsti.[19] Áðrenn hetta var veiðikapasiteturin ikki so stórur, at vandi var fyri, at fiskastovnar kundu verða niðurfiskaðir. Tørvur var tí ikki á at avmarka atgongdina til tilfeingið; øll kundu fiska frítt uttan at fiskastovnar vóru í vanda fyri at verða niðurfiskaðir.

Ástøðiliga grundarlagið undir tørvinum á at avmarka atgongdina til tilfeingið er væl grundað m.a. við Gordon-Schaefer myndlinum, sí mynd 3.1. Niðurstøðan úr Gordon-Schaefer myndlinum er í stuttum, at tá ið luttakarar hava fría atgongd til eitt tilfeingi, ið er avmarkað í nøgd, vilja fleiri og fleiri luttakarar koma í vinnuna til eingin tilfeingisrenta er eftir. Hvør einstakur luttakari fær sjálvur hendur á eyka vinninginum av meira fiskiskapi, men allir luttakarar í vinnuni í felag rinda kostnaðurin av meira fiskiskapi (sum er minni fiskiskapur í framtíðini).

Gordon-Schaefer myndilin lýstur stutt — MYND 3.1




**Kelda:** [7].

Gordon-Schaefer myndilin er lýstur í mynd 3.1. Grundhugsanin í myndlinum er, at (eyka) vinningurin av meira veiðitrýsti verður minni og minni so hvørt, sum veiðitrýstið veksur (stovnarnir vera illa fyri, minni og smærri fiskur verður fiskaður). Hetta fyribrigdi er lýst við strikuni *total revenue*.

Kostnaðurin av meira veiðitrýsti er hinvegin ein bein linja, *total cost* (sum merkir, at t.d. tvey fiskifør kosta tvær ferðir so nógv í rakstri sum eitt fiskifar av sama slagi). Hetta gevur tríggjar møguleikar, sum víst á mynd 3.1, og niðurstøðan er, at fyri at fáa sum mest í úrtøku (netto) er neyðugt at avmarka atgongdina til tilfeingi.

[19] Sí eisini [13], har víst verður á, at hetta fyribrigdið er galdandi í flestu fiskivinnusamfeløgum í heiminum.

Ein onnur niðurstøða úr Gordon-Schaefer myndlinum er, at um veiðitrýstið er stillað búskaparliga rætt, t.e. búskaparliga burðardygt, er veiðitrýstið eisini lívfrøðiliga burðardygt. Hetta sæst við at veiðitrýstið í *A* (altíð) er lægri enn veiðitrýstið í *B* í mynd 3.1. Orsøkin er, at fyri at fáa sum mest í úrtøku netto, er tað búskaparliga skilagott at hava lægri veiðitrýst enn tað lívfrøðiliga burðardygga og harvið brúka minni kostnað til veiðina, sum gevur hægstu úrtøku netto. Fiskifrøðingar hava mett, at fyri flestu fiskasløg er veiðitrýstið í *A* (búskaparligt optimum) umleið 10% lægri enn veiðitrýstið í *B* (lívfrøðiligt optimum).

Í sambandi við at broyta verandi loyvisskipan skal støða takast til:[20]

- Skeringsdagin 1. januar 2018. Fiskivinnan má vita greitt og í góðari tíð, hvør skipan verður galdandi eftir hetta.
- Hvørji tiltøk kunnu verða sett í verk innan loyvini fara úr gildi 1. januar 2018 og hvørji tiltøk kunnu verða sett í verk eftir 1. januar 2018?
- Hvussu skal tað almenna luta út loyvi?
- Spurningurin um atgongd. Hvør skal hava atgongd?
- Hvussu langa tíð eiga fiskirættindi at vera galdandi?
- Spurningurin um umsetiligheit. Skulu fiskirættindi vera umsetilig? Hvussu kann tað almenna tryggja sær, at tað hevur ávirkan á veiðitrýstið, samstundis sum fiskirættindi eru umsetilig?
- Skal loyvisskipanin vera ein *effort*- ella kvotaskipan? Fiskidagaskipanin er ein *effort*-skipan, t.e. myndugleikar stýra *veiðiroyndini*. Kortini er nógvur fiskiskapur í føroyskum sjógvi (og á fjarleiðum) stýrdur við ymsum sløgum av kvotum, t.d. makrelfiskiskapurin, fiskiskapurin eftir gulllaksi og skeljafiskiskapurin.
- Hvør myndugleiki skal áseta fiskidagar og mest loyvda veiði? Skal politiska skipanin ella óheftur stovnur (t.d. ein tjóðbanka-líknandi stovnur) áseta fiskidagar og eina mest loyvda veiði?
- Hvør skal hava tilfeingisrentuna?
- Hvørji stýriamboð skulu myndugleikar hava at stýra veiðitrýstinum?
- Eru fiskirættindi ein *brúksskylda* ella ein *brúksrættur*?

### *3.2.1.2 Stýriamboð eru neyðug*

Grundarlagið undir allari fiskivinnu er tilfeingið – fiskurin. Tí verður eingin fiskivinnuskipan betri enn grundarlagið, t.e. loyvisskipanin, sum skal tryggja, at stovnar verða troyttir á burðardyggan hátt. Til hetta endamál er neyðugt, at myndugleikar hava stýriamboð at

[20] Fleiri av spurningunum niðanfyri verða viðgjørdir í 4.3.

stýra veiðitrýstinum við. Stýriamboðini eru í verandi skipan at áseta eitt mest loyvda tal á fiskidøgum, at áseta stongdar leiðir, umframt at húkur og trol eru skild at.

Veiðiloyvi hava sum kunnugt verið langtíðarloyvi í Føroym, t.e. eftir eini rullandi skipan fyri 10 ár í senn galdandi frá fiskiársins byrjan. Henda skipan er nú tikin av, og øll loyvi fara úr gildi 1. januar 2018. Við gomlu skipanini skuldu loyvi tí sigast upp við 10 ára freist. Tá er greitt, at tað er trupult hjá myndugleikum at ávirka talið á loyvum innan ávísa tíð. Tí hava myndugleikar ikki onnur stýriamboð at stýra veiðitrýstinum við í fiskidagaskipanini enn at áseta eitt mest loyvda tal á fiskidøgum.

Ein skeivleiki í verandi skipan er, at myndugleikar kunnu ávirka talið á fiskidøgum, men hava lítla ella onga ávirkan á talið á loyvum. Tá ið myndugleikar skerja talið á døgum, versnar raksturin hjá hvørjum einstakum skipi. Stýriamboðið er tí torført at brúka og virkar ikki altíð eftir ætlan.

Burtursæð frá tal av loyvum hevur fríur fiskiskapur verið hjá lemmatrolarum[21], garnabátum og skipum, sum fiska gulllaks. Fyri at tryggja eina lívfrøðiliga burðardygga fiskiveiði og, at fiskastovnar ikki verða niðurfiskaðir, eigur allur fiskiskapur antin at verða stýrdur við fiskidøgum ella við kvotum.

Harafturat er tað ein sannroynd, at hóast talið á fiskidøgum til samans í fiskidagaskipanini síðan byrjan er minkað umleið 35%, brúka flestu skipabólkar bara ein part av tillutaðu døgunum, sí talvu 3.1. Dagarnir tykjast tí ikki at vera ein avmarking fyri fiskaríið. Stórur partur av fiskiskapinum undir Føroyum er tí í veruleikanum *frítt fiskarí* (á teimum leiðum, har loyvt er at fiska).

Brúktir fiskidagar í fiskidagaskipanini, fiskifør omanfyri 15 tons, fiskiárini 1998/99 til 2009/10 í % av tillutaðum døgum — TALVA 3.1

| Bólkur/ár | 99/00 | 00/01 | 01/02 | 02/03 | 03/04 | 04/05 | 05/06 | 06/07 | 07/08 | 08/09 | 09/10 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 2 | 94,1 | 88,0 | 81,8 | 73,7 | 75,7 | 76,9 | 81,5 | 90,4 | 87,8 | 86,0 | 105,4 |
| Bólkur 3 | 84,6 | 94,1 | 98,1 | 100,4 | 89,2 | 100,7 | 86,8 | 79,7 | 71,1 | 72,7 | 70,5 |
| Bólkur 4A | 53,7 | 61,5 | 54,7 | 48,8 | 50,4 | 38,1 | 73,3 | 60,0 | 40,0 | 39,1 | 48,3 |
| Bólkur 4B | 90,4 | 100,0 | 97,9 | 115,1 | 119,8 | 108,1 | 83,1 | 54,8 | 53,1 | 64,3 | 66,5 |
| Bólkur 4T | | | | | | | 134,4 | 117,1 | 107,0 | 85,8 | 90,5 |

Viðm.: Tá ið talið er omanfyri 100% merkir hetta, at fiskifør hava útvegað sær eyka dagar við at keypa frá øðrum bólkum, serliga eftir heimildini at avhenda dagar, tá ið 3 mánaðir eru eftir av fiskiárinum.

**Kelda:** Fiskiveiðieftirlitið og úr [20].

Talva 3.1 vísir brúktar dagar í % av tillutaðum døgum býtt á skipabólkar. Talvan vísir, at hóast dagarnar til samans eru skerdir 35% frá 1997/98 til 2009/10, er stórur partur av døgunum óbrúktur. Skipanin kann tí í veruleikanum kallast *frítt fiskarí* (á teimum leiðum, har loyvt er at fiska). Eisini er merkisvert, at hóast stórur partur av døgunum liggja óbrúktir, hevur veiðitrýstið, serliga eftir toski og hýsu, síðstu nógvu árini verið ov høgt. Hetta er tekin um, at ov nógvir dagar og ov nógv skip og veiðikapasitetur yvirhøvur eru í fiskidagaskipanini. Størsti veikleiki í okkara fiskivinnuskipan er, at fiskiveiðin í veruleikanum er *frítt fiskarí* og ikki burðardygg.

[21] Lemmatrolarar eru nú í fiskidagaskipanini.

### *3.2.1.3 Frítt umsetilig loyvi og kapitalisering av loyvum*

Fiskirættindi (veiði-, fiskiloyvi og fiskidagar) hava *de facto* ment seg til frítt umsetilig virði, ið ofta verða umsitin fyri upphæddir langt omanfyri virðið á teimum fiskiførum, tey eru knýtt at. Tað eigur ikki at koma óvart á nakran, at fiskirættindi eru kapitaliserað av vinnuni. Hetta er hent orsakað av, at fiskirættindi í veruleikanum eru *frítt umsetilig langtíðarloyvi*. Henda skipan hevur verið viðvirkandi til, at skuldin í heimaflotanum nærum tvífaldaðist árini 2000 til 2007, sí mynd 2.7.

Hetta er ikki ein góð skipan fyri vinnuna ella fyri fíggingarstovnar, tí at hon hevur við sær ein púra óneyðugan váða. Ein betri skipan fyri vinnuna og fíggjarstovnar hevði verið, um fiskirættindi vórðu seld regluliga á eini skipan við uppboðssølu. Amboð eru tøk, sum kunnu nýtast, soleiðis at fiskifør og fíggingarstovnar hava góða trygd fyri rávøru, hóast *stutttíðarloyvi* verða seld eftir eini skipan við uppboðssølu; t.d. við opsjónum á fiskirættindi og forkeypsrættum, sum fiskifør kunnu keypa fyri at hava góða trygd fyri rávøru í framtíðini.

Virðið á einum frítt umsetiligum loyvi, galdandi í t.d. 10 ár, er sera torført at meta um, tí at náttúran, fiskastovnar, fiska- og oljuprísir sveiggja nógv. Lættari er at meta um virðið á einum brúksrætti, sum er galdandi t.d. ein ársfjórðing, eitt hálvár ella í eitt ár. Fiskifør høvdu við eini tílíkari skipan helst havt betri trygd fyri rávøruni. Fingu fiskavirki møguleika at keypa fiskirættindi, sum tey so kunnu gera sáttmálar við skip um at fiska, hevði teirra trygd fyri rávøru eisini verið betri. Sostatt skuldu møguleikarnir hjá vinnuni at fíggja nýggjar íløgur og skip blivið betri, um fiskirættindi vórðu seld regluliga á eini uppboðssølu.

Í lóg um vinnuligan fiskiskap er ásett, at veiði- og fiskiloyvi kunnu ikki setast í veð.[22] Tað er ivasamt, um ásetingin ávirkar møguleikarnar hjá vinnuni at kapitalisera fiskirættindi. Staðfestast kann, at kapitalisering av fiskirættindum fer fram hóast hesa áseting. Peningastovnar kunnu á ymsan annan hátt enn við beinleiðis veð í fiskirættindum tryggja sær, at hóskandi trygd er fyri tí lánsveiting, sum verður givin, og sum m.a. fíggjar keyp av fiskirættindum. Hetta kann t.d. vera við eyka trygdum, við at tryggja sær avgerandi ávirkan á fyritøkuna, við at tryggja sær, at onnur lán ikki verða tikin, við trygd í partapeninginum ella við trygd í veiðivirðinum í framtíðini o.s.fr.

### *3.2.1.4 Stutt um at selja fiskirættindi uppboðssølu*

Omanfyri varð stutt nevnt, at til ber at selja fiskirættindi í eini skipan við uppboðssølu, og at hetta búskaparliga hevði verið ein betri skipan enn verandi skipan við frítt umsetiligum langtíðarloyvum. Evnið *at selja fiskirættindi á uppboðssøla* er kortini eitt torført og eymt mál. Búskaparráðið viðurkennir eisini, at fleiri ivamál eru hesum viðvíkjandi, og at eitt ávíst fyrireikingararbeiði skal gerast, áðrenn til ber at seta eina tílíka skipan í verk – í øllum førum fyri allan fiskiskapin undir Føroyum.

Óivað verður nógv mótstøða, m.a. í fiskivinnuni sjálvari, móti at seta eina tílíka skipan í verk. Harafturat eru sera fá dømi í heiminum um tílíkar skipanir og fáar fyrimyndir at vísa á úti í heimi á hesum øki. Sjálv mannagongdin við uppboðssølu er kortini væl kend og roynd sum søluháttur av øðrum enn fiskirættindum, t.d. Fiskamarknaður Føroya.

[22] Lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 7b, stk. 5.

Mannagongdin sjálv er tí væl kend. Búskaparráðnum kunnugt eru einastu dømi um, at fiskirættindi hava verið seld á uppboðssølu, hesi:

- Russlandi og Estlandi (í báðum londum árin 2001-2003, síðani varð farið frá skipanini aftur)
- Kili
- Staturin Washington (USA)
- Falklandsoyggjar

Í Russlandi og Estlandi varð farið frá skipanini, tí skipanin sum heild ikki fekst at virka væl og tí at mótstøða var í fiskivinnuni sjálvari. Fiskivinnufyritøkur kundu ávirka prísirnar á rættindum m.a. við sambandi og samstarvi sína millum. Úrslitið var, at prísirnir á fiskirættindum vóru óstøðugir.

Í Kili verða nøkur rættindi til fiskiskap sunnaliga í Kilenskum sjógvi seld á uppboðssølu, og í Washington verða rættindi til nakað av skeljafiskiskapi seld á uppboðssølu. Meginparturin av rættindunum til fiskiskapin við Falklandsoyggjar verður seldur á uppboðsølu.

Ein møguleiki, sum kundi verið royndur í Føroyum, er at tað almenna eftir eini skipan við uppboðssølu lutar út rættindi til nýggjan fiskiskap, sum tekur seg upp í føroyskum sjógvi ella aðrastaðni í millumlandasamstarvi. Dømi um tílíkan fiskiskap, har ið fiskirættindi ikki eru givin við søguligum rættindum, eru makrelfiskiskapurin í føroyskum sjógvi og toskafiskiskapurin á Flemish Cap.

#### *3.2.1.5 Avhending av døgum*

Í verandi skipan ber til at avhenda dagar undir ávísum treytum millum høvuðsbólkar í fiskidagaskipanini endaliga ella fyri eitt fiskiár í senn, tá ið tríggir mánaðir eru eftir av fiskiárinum. Húkur og trol eru tó skild at, soleiðis at dagar ikki kunnu avhendast millum trolara- og húkaflotan. Innanhýsis í hvørjum bólki sær ber til undir ávísum treytum at avhenda dagar alt fiskiárið.

Avhending av fiskidøgum í % av tillutaðum døgum eftir bólkum í fiskidagaskipanini fiskiárini 2000/01 til 2009/10 — TALVA 3.2

| Bólkur/ár | 00/01 | 01/02 | 02/03 | 03/04 | 04/05 | 05/06 | 06/07 | 07/08 | 08/09 | 09/10 | Miðal |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Bólkur 2 | 8,9 | 11,2 | 6,9 | 13,6 | 5,9 | 11,6 | 5,5 | 4,9 | 20,1 | 17,6 | 10,6 |
| Bólkur 3 | 5,4 | 7,6 | 6,5 | 9,1 | 11,4 | 8,4 | 11,1 | 9,4 | 11,3 | 26,7 | 10,7 |
| Bólkur 4A | 9,0 | 17,4 | 11,2 | 43,1 | 24,4 | 5,7 | 3,9 | 9,5 | 6,1 | 3,6 | 13,4 |
| Bólkur 4B | 7,8 | 14,0 | 6,6 | 10,2 | 14,7 | 5,2 | 3,1 | 1,8 | 0,5 | 13,5 | 7,7 |
| Bólkur 4T* | | | | | | 5,3 | 7,0 | 7,6 | 22,5 | 29,3 | 14,3 |

* Í 2005 vórðu trolbátar í 4B eisini skipaðir í ein bólk fyri seg - bólkur 4T.
**Kelda:** Fiskiveiðieftirlitið og úr [21].

Bólkur 5 er undantikin frá hesum, og dagar kunnu ikki avhendast frá bólki 5. Treytin fyri at avhenda dagar er, at 60% av tillutaðu døgunum, fiskiárið frammanundan, eru brúktir.[23]

[23] Sí [21], har nærri er greitt frá reglunum fyri at avhenda fiskidagar og kvotur.

Skottið millum húk og trol er sett í lógarverkið fyri at forða fyri, at veiðitrýstið økist ov nógv av umsetiligheitini og at ov nógvir fiskidagar verða keyptir upp av trolaraflotanum. Talva 3.2 vísir, hvussu fiskidagar eru avhendaðir, býtt á bólkar fiskiárini 2000/01 til 2009/10.

### 3.2.2 Forðingar fyri kapping og produktivitetsvøkstri

Fyri at ein vinna skal vera so virkisfør (produktiv) sum gjørligt, er neyðugt, at vinnan fær kappast frítt bæði innanhýsis og við aðrar vinnur um arbeiðsmegi og aðrar framleiðslufaktorar. Kapping merkir í hesum førinum, at fyritøkur, sum eru meira lønandi, hava møguleika at troka minni lønandi fyritøkur úr vinnuni og av marknaðinum. Kanningar benda á, at meginparturin av produktivitetsvøkstri stavar frá kappingartrýsti, t.e. at meira lønandi fyritøkur hava møguleika at troka minni lønandi fyritøkur úr vinnuni.[24]

Í verandi fiskivinnuskipan eru fleir forðingar fyri kapping. Nevnast kann stuðulin frá tí almenna. Harafturat koma bólkabýtið í fiskidagaskipanini, fiskavirkisskipanin, ognaravmarkingarnar[25] og avmarkingarnar á útlendskum ognarparti[26].

#### *3.2.2.1 Ognaravmarkingar*

Ognaravmarkingarnar vórðu óivað ætlaðar at forða fyri, at fiskirættindi savnast á fáum hondum. Búskaparliga sæð og fyri vinnuna er tað ein fyrimunur, um fiskirættindi hava møguleika at savnast á fáum hondum, um feløg t.d. hava hug at leggja saman fyri at fáa fyrimunir av stórrakstri. Hetta er ein fyritreyt fyri, at kappingin kann virka frítt eins og í øðrum vinnum.

Ognaravmarkingarnar eru lættar at fara uttanum og kunnu ikki handhevjast, og tær elva til strámannavirksemi í fiskivinnuni. Tað kann hugsast, at ásetingin - í sambandi við strámannavirksemi – hevur somu árin á vinnuna sum avmarkingin á útlendskum ognarskapi. Tilvildarligar ognaravmarkingar viðføra neyvan hægri - men hinvegin lægri - framleidni (produktivitet) í fiskivinnuni. Tilvildarligar ognaravmarkingar ella avmarkingar í útlendskum ognarparti eru sum heild ikki galdandi fyri aðrar vinnur.

Um tað almenna tryggjar sær, at tað fær hendur á tilfeingisrentuni, t.d. við at selja fiskirættindi á eini uppboðssølu, er tað búskaparliga sæð skilabest, um føroyskar og útlendskar fyritøkur hava javnbjóðis rætt at ogna sær rættin at gagnnýta tilfeingið. Løgtingið hevur lóggávuheimildina yvir livandi tilfeinginum í føroyskum sjógvi, og Løgtingið missir tí ikki ræðisrættin á tilfeinginum í føroyskum sjógvi, hóast avmarkingarnar í ognarpartinum hjá útlendskum fyritøkum verða strikaðar.[27]

#### *3.2.2.2 Almennar stuðulsskipanir*

Stuðulsskipanirnar til vinnuna forða eisini fyri kapping. Almennu stuðulsskipanirnar eru sjómannafrádráttur, MVG-undantøk og undantøk í brennioljugjaldinum. Harafturat letur

---

[24] Kanningarnar í [1] benda á, at umleið 70% av produktivitetsvøkstri stava frá kappingartrýsti millum fyritøkur, t.e. at nýggjar fyritøkur hava lætta atgongd at sleppa inn á marknaðir, at meira lønandi fyritøkur hava møguleika at troka minni lønandi fyritøkur av marknaðum.

[25] Lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 7a, stk. 1.

[26] Lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 7.

[27] Sí eisini [17].

tað almenna óbeinleiðis stuðul til vinnuna við at fiskivinnan fær ókeypis atgongd til tilfeingi – fiskirættindi – og við at vinnan ikki ber allan tann kostnað, sum hon krevur av samfelagnum, fyri at virðisøkingin skal vera sum mest (fiskiveiðieftirlit og aðrar eftirlitsskyldur, sum alivinnan t.d. ber kostnaðin av í teirra føri).

Fiskavirkisskipanin er eisini eitt dømi um eina almenna stuðulsskipan til fiskavirki á landi. Upprunaliga hugsanin við fiskavirkisskipanini var at forða fyri, at trot á rávøru, sum kann koma fyri partar av árinum, skal ávirka arbeiðsfólk á fiskavirkjum í ov stóran mun og gera, at tey leita sær arbeiði í øðrum vinnum. Fiskavirkisskipanin er neyvan rætta amboðið at náa hesum endamáli. Besta amboðið er at umskipa fiskivinnuna til eina burðardygga vinnu og lata fiskivinnuna virka eftir marknaðarligum treytum, soleiðis at hon fær tillagað framleiðslukapasitetin til tað rávørugrundarlag, sum er undir Føroyum.

Fyri tey, sum arbeiða í fiskavirkisvinnuni hevði hetta verið besta trygdin fyri, at fiskavirki fáa nóg mikið av rávøru til framleiðsluna. Fiskavirkisskipanin hevur eisini aðrar óhepnar avleiðingar, sum kanska ikki vóru so eyðsýndar, tá ið fiskavirkisskipanin varð sett í verk. T.d. kann hon eggja fiskavirkjum at leggja sína framleiðslu til rættis soleiðis yvir tíð, at fiskavirkisskipanin í veruleikanum lutvíst rindar lønarútreiðslurnar hjá fiskavirkjum.

#### *3.2.2.3 Torført hjá nýggjum fólki at sleppa framat í vinnuni*

Skal frí kapping vera í eini vinnu, er neyðugt, at nýggir luttakarar hava møguleika at royna seg í vinnuni og at fyritøkur, sum eru meira lønandi, kunnu økja um sítt virksemi við at keypa upp aðrar fyritøkur. Í verandi skipan er torført hjá fólki, sum hava hug at royna seg í vinnuni, at fáa atgongd, m.a. tí at fiskirættindi eru *langtíðarloyvi*,[28] sum kunnu umsetast frítt og verða kapitaliserað til høg virði og við óneyðuga stórum váða fyri vinnuna.

Nógvur kapitalur (t.e. eginpeningur og/ella lántøka) skal til fyri at fáa hendur á hesum fiskirættindum. Ein betri skipan fyri vinnuna og fíggingarstovnar hevði verið, um fiskirættindi ístaðin vóru stutttíðarloyvi, t.e. um fiskidagar (ella kvotur) vórðu seld regluliga á uppboðssølu sum ein *brúksrættur* galdandi ávíst tíðarskeið. Hetta hevði forðað fyri, at loyvi kunnu kapitaliserast – í øllum førum í tann mun, sum verandi loyvisskipan leggur upp til.

### 3.2.3 Krøv til landing

Í lóg um vinnuligan fiskiskap eru eisini forðingar fyri, at fiskur, veiddur undir Føroyum, kann verða avreiddur uttanlands,[29] umframt at forðingar eru fyri, at fiskur kann verða tilvirkaður umborð á skipum, sum royna undir Føroyum.[30] Undantøk kunnu lýsast frá hesi skipan við kunngerð, men skipanin er ósmidlig. Tílíkar forðingar og avmarkingar forða fyri kapping, fríari tillaging í vinnuni og tálma produktivitetsvøkstri.

Avmarkingarnar nevndar omanfyri eru tó neyvan størsta orsøkin til vánaliga lønsemið í vinnuni síðstu nógvu árini. Yvirhøvur er lítil munur á fiskaprísum í Føroyum og í okkara grannalondum, m.a. tí at útlendskir fiskakeyparar hava góðar møguleikar at keypa fisk í

[28] Sí brot 3.2.1.

[29] Lóg um vinnuligan fiskiskap grein 9, stk. 4 og grein 19, stk. 1 og stk. 2.

[30] Lóg um vinnuligan fiskiskap grein 10, stk. 1.

Føroyum. Harafturat eru tað fá skip, sum siga seg hava tørv á at avreiða meira enn 25% av veiðini uttanlands hvønn ársfjórðing.

Viðvíkjandi møguleikunum at tilvirka fisk umborð er ivasamt, hvussu lønandi tað hevði verið at tilvirka fisk umborð á skipum undir Føroyum meira enn at frysta sløgdan ella avhøvdaðan fisk. Fiskavørur, sum eru tilvirkaðar á landi, verða yvirhøvur seldar fyri hægri prís enn fiskur, sum er tilvirkaður umborð á skipum, av tí at góðskan er ein onnur. Harafturat er framleiðsla, sum illa kann fara fram umborð á skipum, orsakað av at framleiðslan krevur nógv pláss og tíð, t.d. framleiðsla av saltfiski.

### 3.2.4 Lønarskipanin

Ein annar skeivleiki í vinnuni, sum vinnan eisini er varug við, og ætlanir eru um at broyta, er at verandi lønarskipan eggjar ikki vinnuni at effektivisera umborð á skipum. Skipanin við hýrum er soleiðis háttað, at lønarútreiðslurnar lækka ikki, um feløg effektivisera umborð á skipum og harvið skulu hava færri fiskimenn við umborð. Dømi eru um, at lønarútreiðslurnar heldur *hækka* av hesum. Ein betri skipan hevði verið, um lønirnar vórðu goldnar lutvíst sum føst løn og lutvíst sum %-partur av avlopinum í fiskivinnufyritøkum.

Lønarskipanin er eitt mál, ið eigur at vera upp til partarnar á arbeiðsmarknaðinum (í hesum føri manningarfeløgini og Føroya Reiðarafelag) at taka støðu til og gera av. Tað almenna eigur ikki at gera av ella leggja seg út í, hvør lønarskipan skal vera galdandi í fiskivinnuni.

### 3.2.5 Fiskivinnan og økispolitikkur

Í endamálsorðingini í lóg um vinnuligan fiskiskap verður sagt, at fiskivinnupolitikkurin umframt lívfrøðilig og búskaparlig atlit skal tryggja *møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið*.[31] Fiskivinnupolitikkurin skal sostatt eftir endamálsorðingini hava økispolitisk atlit í sær. Tað er ivasamt, um tað er uppgávan hjá fiskivinnuni at tryggja arbeiðspláss og virksemi kring alt landið. Til hesi endamál verður heldur mælt til at nýta beinleiðis økispolitisk tiltøk.

[31] Lóg um vinnuligan fiskiskap, grein 2, stk. 1.

## 3.3 TILMÆLI TIL BROYTINGAR

Fiskiveiðin undir Føroyum verður ikki umsitin á burðardyggan hátt, og hetta er størsta orsøkin til vánaligu støðuna í heimaflotanum og størsta forðingin fyri búskaparligum avkasti í fiskivinnuni. Fiskiskapurin undir Føroyum er í veruleikanum *frítt fiskarí* (á teimum leiðum, har loyvt er at fiska), og undir tílíkum umstøðum kann fiskivinna ikki vera ein lønandi vinna og kann ikki geva størst møguligt búskaparligt avkast. Fyri at broyta hetta er neyðugt at broyta fiskivinnuskipanina grundleggjandi við tí endamáli at gera fiskiveiðina burðardygga.

Sum víst verður á niðanfyri, kunnu fleiri broytingar fremjast innan skeringsdagin 1. januar 2018 fyri at gera fiskiveiðina burðardygga. Onnur stig kunnu takast í sambandi við, at øll loyvi fara úr gildi 1. januar 2018. Innan 1. januar 2018 ber til at seta hesi stig í verk:

- Talið á fiskidøgum í fiskidagaskipanini kann skerjast samsvarandi lívfrøðiligu ráðgevingini.

- Politiska skipanin kann áseta ein veiðisetning (*catch control rule*) fyri tey týðandi fiskasløgini, sum verða fiskað undir Føroyum. Harafturat ber til at áseta eina *recovery plan* fyri tey mest týðandi fiskasløgini, sum verða fiskað í føroyskum sjógvi.

- Tað almenna kann seta brúksskyldu á fiskiloyvi og ógilda ella taka aftur loyvi, sum ikki verða brúkt innan ávíst tíðarskeið við tí fyrivarni, at veiðitrýstið ikki veksur av hesum.

- Fiskiloyvi og onnur rættindi, sum tað almenna kallar aftur, kunnu lutast útaftur eftir eini skipan við uppboðssølu, við tí fyrivarni at veiðitrýstið ikki veksur av hesum.

- Tað almenna kann luta út rættindi til nýggjan fiskiskap, sum tekur seg upp í føroyskum sjógvi ella aðrastaðni í millumlandasamstarvi eftir eini skipan við uppboðssølu. Rættindi til tílíkan fiskiskap eru ikki givin við søguligum rættindum. Dømi eru makrelfiskiskapurin undir Føroyum og toskafiskiskapurin á Flemish Cap.

- Til ber at strika almennu stuðulsskipanirnar til vinnuna, forðingarnar fyri kapping og fyri fríari tillaging.

- Til ber at endurskoða bólkabýtið í fiskidagaskipanini m.a. við tí endamáli at minka veiðina eftir smáfiski, sum fer fram inni við land.

### 3.3.1 Flyta ásetingina av fiskidøgum úr politisku skipanini

Verandi skipan, har ið politiska skipanin ásetur eitt mest loyvda fiskidagatal fyri fiskiskapin í fiskidagaskipanini, hevur víst seg ikki at vera rætti háttur at áseta eitt mest loyvda dagatal. Hetta er yvirhøvur tekin um, at tey amboð, sum myndugleikar hava í verandi skipan at stýra veiðitrýstinum, ikki eru nóg mikið at tryggja eitt hóskandi veiðitrýst og eina burðardygga fiskiveiði. Hetta sæst greidliga av, at hóast lutfalsliga lítil partur av døgunum í fiskidagaskipanini til samans verða brúktir, sí talvu 3.1, so hevur veiðitrýstið seinni árini eftir toski og hýsu verið ov stórt.

Royndirnar úr verandi skipan, har ið politiska skipanin ásetur fiskidagarnar í fiskidagaskipanini, vísa týðuliga, at politiska skipanin ikki í nóg stóran mun er før fyri at taka atlit at langtíðargongd og –støðuni hjá fiskastovnunum og fiskivinnuni yvirhøvur. Freistingin hjá politisku skipanini at taka stutttíðaratlit er stór, m.a. tí at løgtingsval eru við jøvnum millumbilum. T.d. er trupult hjá politisku skipanini at skerja dagatalið í fiskidagaskipanini munandi, hóast hetta lívfrøðiliga sæð er tað skilabesta. Ein betri skipan hevði verið, at ein óheftur stovnur fekk ábyrgdina av at áseta eitt mest loyvda dagatal fyri fiskiskapin undir Føroyum eftir lívfrøðiligum fyritreytum (eitt sokallað *TAC* – total allowable catch). Hesin stovnur kundi verið sami stovnur, sum hevði ábyrgdina av at skipa eina uppboðssølu av fiskirættindum.

### 3.3.2 Selja fiskirættindi á uppboðsølu

Búskaparráðið hevur tað grundsjónarmið, at skipan við almennari uppboðssølu av rættindum hevði verið frægasta skipanin hjá tí almenna at luta út fiskirættindi. Hetta hevði skundað undir tillagingar í flotanum eftir marknaðarligum treytum og gjørt, at mest lønandi og effektivu fyritøkur fingu hendur á fiskirættindum.

Rávørugrundarlagið undir fiskif: ørum og fiskavirkjum hevði verið tryggari við eini skipan við almennari uppboðssølu av loyvum. Um loyvi vórðu seld regluliga á eini uppboðssølu, sum vóru galdandi í styttri tíð enn í verandi skipan, hevði vinnan sloppið undan at taka stóran váða á seg fyri at fáa hendur á rættindum, sum talan nú er um. Ein tílík skipan hevði eisini gjørt tað møguligt hjá landskassanum og samfelagnum, sum eiga tilfeingið, at fingið lut í tilfeingisrentuni.

Í várfrágreiðingini í 2000 hjá Búskaparráðnum var eitt uppskot um, hvussu ein tílíkur marknaður kann skipast.[32] Ein tílík skipan við uppboðssølu av fiskirættindum er frægasti háttur at luta út fiskirættindi, og hon kann, er vilji til staðar, setast í verk í sambandi við, at øll loyvi fara úr gildi og fella aftur til landið 1. januar 2018. Búskaparráðið viðurkennir eisini, sum nevnt í 3.2.1.4, at tað skal fyrireikingararbeiði gerast, áðrenn ein uppboðssøla av fiskirættindum kann setast á stovn – í øllum førum fyri allan fiskiskapin undir Føroyum. Nógv ivamál eru eisini hesum viðvíkjandi, sum nevnt áður (sí brot 3.2.1.4).

Ein møguleiki er, at tað almenna byrjar við at luta út rættindi eftir eini skipan við uppboðsølu til nýggjan fiskiskap, sum tekur seg upp í føroyskum sjógvi ella aðrastaðni í millumlandasamstarvi. Dømi um tílíkan fiskiskap eru makrelfiskiskapurin í føroyskum sjógvi og toskafiskiskapurin á Flemish Cap. Skotið verður upp, at rættindi til tílíkan fiskiskap, sum ikki eru givin við søguligum rættindum, verða seld eftir eini skipan við uppboðssølu.

Hetta hevði tryggjað, at tey effektivastu skipini stóðu fyri fiskiskapinum, og at landskassin sum umboð fyri eigaran, Føroya fólk, fekk lut í tilfeingisrentuni. Ber hetta ikki til í 2011, m.a. tí at ov nógv er fráliðið av árinum, kann eitt avgjald í staðin í eini skiftistíð verða tikið fyri tær kvotur, ið verða lutaðar út. Taka vit makrelfiskiskapin sum dømi, kunnu vit siga, at kvotan í 2011 verður 100 tús. tons. Makrelur kann avreiðast fyri 7-8 kr./kg. í miðal.[33]

---

[32] Sí [3].

[33] Sí t.d. talvu 3.6 í [6].

Avreiðingarvirðið á makrelinum er tí 700-800 mió. kr. Eitt avgjald til landskassan á t.d. 2 kr./kg. hevði givið 200 mió. kr.

### 3.3.3 Strika forðingar fyri kapping og fríari tillaging

Tað skilabesta fyri fiskivinnuna er, at hon virkar eftir marknaðarligum treytum eins og aðrar vinnur. Tí verður skotið upp, at allur beinleiðis og óbeinleiðis stuðul til fiskivinnuna, nevndur í 3.2.2, 3.2.3 og 3.2.5, verður strikaður, og at forðingar fyri fríari kapping og tillaging eisini verða strikaðar. Eisini verður mælt til at strika orðingina í endamálsorðingini í lóg um vinnuligan fiskiskap um, at fiskivinnupolitikkurin skal tryggja møguleikar fyri vinnuligum virksemi um alt landið. Mælt verður heldur til at reka økispolitikk við beinleiðis økispolitiskum tiltøkum.

Mælt verður eisini til at strika forðingarnar fyri avreiðingum uttanlands og til at strika avmarkingarnar í møguleikunum at tilvirka fisk umborð á skipum, sum royna undir Føroyum. Viðvíkjandi fiskavirkisskipanini verður skotið upp, at skipanin verður tikin av líðandi eftir nøkrum árum, og at farið verður undir at nýta eina fastlønarskipan í staðin. Ein tílík skipan hevði fyri tey, sum arbeiða í fiskavirkisvinnuni, verið ein betri trygd fyri fastari inntøku, um framleiðslukapasiteturin varð tillagaður til rávørugrundarlagið, sum er undir Føroyum. Eisini verður mælt til at endurskoða bólkabýtið í fiskidagaskipanini við tí fyrivarni, at veiðitrýstið til samans ikki veksur av hesum. Í sambandi við at endurskoða bólkabýtið eigur støða at verða tikin til bólkarnar 5A og 5B og møguleikunum hjá hesum bólkum at avreiða vinnuliga, sum vórðu viðgjørdir stutt í broti 2.3.3.1. Tað er m.a. neyðugt at taka støðu til hetta, tí at sum víst varð á í talvu 3.2 standa hesar bólkar fyri stórum parti av veiðini eftir smáfiski. Politiskt eigur at verða viðgjørt, um tað er rætt og um vit hava ráð at lata summum mestsum fría atgongd til ískoytisvinnu úr okkara felags tilfeingi.

### 3.3.4 Samanumtikið

Mælt verður til, at spurningarnir omanfyri (og aðrir nevndir í frágreiðingini t.d. á bls. 21) verða umrøddir í breiðum fiskivinnupolitiskum høpi. Mælt verður frá at gera einstakar smærri broytingar í fiskivinnuskipanini uttan samstundis at viðgera og taka støðu til grundvøllin ella grundarlagið undir okkara fiskivinnuskipan, loyvisskipanina, t.d.

- Hvussu skal landið luta út fiskirættindi?
- Hvør skal hava atgongd til fiskirættindi?
- Hvørji amboð skal tað almenna hava at stýra fiskiveiðini við, soleiðis at fiskiveiðin er lívfrøðiliga burðardygg?
- Hvørjar eginleikar hava fiskirættindi?
- Er bólkabýtið í fiskidagaskipanini hóskandi til fiskiveiðina í dag?
- Hvør eigur rættin til tilfeingisrentuna?

# 4. KONJUNKTURMETING

## 4.1 HEILDARMETING

Mett verður, at BTÚ í ársins prísum vaks útvið 1% í 2010 sammett við 2009. Vøksturin stavaði fyrst og fremst frá, at framleiðslan í tilfeingisvinnunum vaks, meðan almenni geirin stimbraði eftirspurningin við halli í landskassanum, hjá kommununum og í almennum grunnum.

Nakað av óvissu er um vøksturin í BTÚ fyri 2011 orsakað av, at ein av stóru bankunum, Eik Banki, er í eini tilgongd við eigaraskifti, sum kann ávirka útlánsvirksemið hjá bankanum í ár. Framleiðslan í fiskivinnuni í 2011 verður møguliga ávirkað av húsaganginum í Faroe Seafood og av sáttmálaósemjuni millum Føroya Reiðarafelag og manningarfeløgini. Harafturat kemur, at framleiðslan í fiskivinnuni býtt á skipabólkar broytist orsakað av ósemjuni millum strandalondini um makrelfiskiskapin. Tað er torført at siga við vissu, hvørja ávirkan hetta fær á vøksturin í BTÚ.

Við nevndu fyrivarnum eru útlit til, at BTÚ í 2011 og 2012 í miðal kann vaksa 5% um árið í ársins prísum. Vøksturin stavar frá, at útlit eru til frægari fiskiskap eftir botnfiski undir Føroyum næstu árini, umframt at privata nýtslan væntandi fer at vaksa nakað. Eisini verður væntað, at privatar íløgur fara at vaksa. Harafturat kemur eitt íkast til vøksturin í BTÚ frá, at framleiðslan í alivinnuni væntandi veksur nakað næstu árini. Hinvegin fer tað at tálma vøkstrinum, at fíggjarpolitikkurin hjá landi og kommunum væntandi verður táttaður nakað fyri at minka um hall og tað, at peningastovnar mest sannlíkt verða varnir við at vaksa um útlánini.

Arbeiðsloysið við endan av 2010 var ávirkað nógv av húsaganginum hjá Faroe Seafood. Hildið verður, at arbeiðsloysið lækkar aftur seinri í ár, tá ið fiskavirki, um ikki øll, í búnum eftir Faroe Seafood eru virkin aftur, men eisini tí at útlit eru fyri meira virksemi á fleiri økjum.

Húsarhaldsnýtslan verður mett at geva positivt ískoyti til vøksturin í BTÚ í 2010. Hetta hongur saman við, at húsarhaldini hava vent gongdini, soleiðis at tey aftur brúka ein heldur størri part av inntøkuni til nýtslu. Hetta er vert at leggja til merkis, tá so stórar rembingar fóru fram í búskapinum. Eik-samtakið fór á húsagang og varð yvirtikið av Finansiel Stabilitet. Faroe Seafood hevði verið í trupulleikum í longri tíð og endaði í trotabúarviðgerð í desember. Alt tað seinasta fjórðingsárið 2010 var ávirkað av hesum hendingum. Hóast tað var ávirkanin á væntanirnar hjá húsarhaldunum ikki størri enn, at privata nýtslan vaks í 2010 sum partur av inntøkuni. Sum útlitini eru, verður eisini væntað, at húsarhaldini fara at vaksa nýtsluna sum partur av inntøkuni nakað í 2011 og 2012 eins og nøkur ár frameftir.

Tað er væl hugsandi, at hesar ógvusligu hendingar í vinnulívinum hava havt negativa stutttíðarávirkan á væntanir hjá húsarhaldum og fyritøkum. Hinvegin vóru bæði nýtsla og privatar íløgur á sera lágum stigi í 2010 aftaná búskaparligu niðurgongdina í 2008 og 2009. Hetta merkir, at negativu avleiðingarnar fyri bæði nýtslu og íløgur eru vorðnar minni enn, um búskapurin hevði havt eina meira vanliga útgangsstøðu áðrenn hendingarnar.

Tað at ein so stórur banki sum Eik Banki fór á húsagang og undir umskipan, kundi hugsast at fáa stórar avleiðingar fyri útlánsvirksemið í Føroyum við møguligari *kredittklemmu*, har góðar vinningsgevandi íløgur ikki fingu fígging. Mett verður tó, at manglandi eftirspurningur eftir fígging til nýtslu og íløgur í størstan mun hevur virkað avmarkandi fyri útlánsvirksemið hjá bankunum, hóast varnari útlánspolitikkur helst eisini hevur verið galdandi.

Fíggjarstøðan hjá bankunum er framvegis merkt av, at bankarnir øktu lántøkuna nógv á evropeiskum lánsmarknaðum árini 2004-2007, og av at teir hava virkað undir ríkistrygd síðan altjóða fíggjarkreppuna í 2008. Ríkistrygdin var fyrst generel, men er síðan gjørd individuel, har peningastovnar eftir umsókn hava fingið játtað hybridkapital og ríkisveðhald, sum teir rinda fyri. Eik Banki hevur harumframt fingið nýggjan kapital, eins og vánaligir partar av bankans virksemi vórðu yvirtiknir av Finansiel Stabilitet. Henda ríkistrygd er sambærilig við ta trygd, sum hevur verið latin bankum í stórum parti av vesturheiminum.

Fyribils er ætlanin, at bankarnir í danska ríkinum skulu klára seg við egnari megi frá seinnu helvt av 2013. Tað er neyvan sannlíkt, at bankarnir kunnu troyta somu lánsmarknaðir í sama mun eftir 2013 sum undan altjóða fíggjarkreppuni. Tí er væl møguligt, at útlán frá bankum verða avmarkandi fyri vøkstur, so hvørt sum ynski um størri nýtslu og íløgur fara at vísa seg hjá húsarhaldum og fyritøkum. Mett verður tó ikki, at viljin ella førleikin til at læna út verður ein álvarslig forðing í 2011 og kanska heldur ikki í 2012. Metingin er eisini gjørd við tí fyritreyt, at Eik Banki hevur fingið nýggjar eigarar (TF-Holding eigur 70% og Finansiel Stabilitet 30% av partapeninginum), sum eru við at skipa nýggja leiðslu av bankanum.

Fýra virki og seks skip í Faroe Seafood samtakinum, sum hevur verið í trotabúsviðgerð, hava frá mánadegnum 21. februar fingið nýggjan eigara. Serstøðan, sum hevur verið síðan desember við lítlum virksemi og stórum arbeiðsloysi, kann tí um stutta tíð væntast at vera av. Eftir hesa endurskipan eru útlit til, at kapasiteturin til virking av botnfiski fer at hóska væl betur til rávørunøgdirnar, og tí fiskavirkini vænta ein betri rakstur eins og betri kappingarføri til at keypa fisk. Um so verður, kunnu vit vænta ein produktivitetsvøkstur komandi árini á hesum øki.

Sáttmálaósemjan millum manningarfeløgini og reiðarafeløgini er í høvuðsheitum av við marginalt betri rakstri fyri skipabólkar við vánaligum rakstri vegna høgar oljuprísir. Sambært forward-prísum verður væntað í marknaðinum, at Brent olja fer at kosta millum 90 og 110 USD pr. tunnu fram til 2012. Orkukostnaður má tí væntast at draga niður í búskaparvøksturin komandi 2 árini, men mett verður framvegis, at fiskiskapurin eftir botnfiski verður betri í 2011 enn í 2010.

Eingin avtala verður í 2011 millum strandalondini um makrelfiskiskapin, tí at londini áseta egnar kvotur. Ein avleiðing er, at veiðiavtalur ikki eru endurnýggjaðar við Noreg og ES, sum ger, at nakrir skipabólkar fáa verri veiðirættindi, meðan makrelfiskiskapurin verður í føroyskum sjógvi. Eisini kunnu væntast havnastongslar fyri landing av makreli í Noregi og ES-londum. Royndirnar frá 2010 vísa tó, at avleiðingarnar av hesum vóru ikki so ógvusligar, tí at alternativir sølumøguleikar finnast.

Búskaparvøkstur í fleiri menningarlondum hevur við sær, at ein skjótt vaksandi fjøld av brúkarum fara at eftirspyrja dygdargóðar fiskavørur. Marknaðarútlitini fyri føroyska fiskivinnu eru tí yvirhøvur góð.

Samanumtikið eru útlit til, at búskapurin fer at vaksa í 2011 og 2012. Tað, at húsarhaldini vera trygg við at hækka nýtsluna nakað, hevur við sær, at avgjaldsinntøkur hjá landinum kunnu vaksa skjótari enn BTÚ. Konjunkturgongdin fer tí at minka nakað um landskassahallið. Harumframt kann hallið minkast við átøkum uttan at taka burtur allan búskaparvøksturin. Hetta er ynskiligt fyri at almenna skuldin framvegis verður á einum hóskiligum stigi, sum ger, at Føroyar tola sveiggj í búskapinum uttan at missa álit frá egnum borgarum og lánveitarum.

## 4.2 BÚSKAPARLIG ÚTLIT

### 4.2.1 Seinasta konjunkturgongdin

Lønargjaldingar hava – roknað sum rullandi árligur summur – verið í minking síðani apríl 2009 til august í fjør, men eru nú aftur vaksandi. Leypandi árliga minkingin í lønarútgjaldingum var 4,5% fyri góðum ári síðan, men árligu lønargjaldingarnar eru í januar 2% størri enn fyri einum árið síðan. Gongdin í lønargjaldingum er tó ikki eins innan ymsu vinnubólkarnar.

Árlig %-broyting í lønarútgjaldingum, rullandi 12 mðr summur, jan-05 til jan-11 MYND 4.1




Kelda: Hagstova Føroya.

Í fiskiveiði varð útgoldið 24% meira í lønum í 2010 sammett við 2009, og eftir stíg í lønarútgjaldingum í alivinnuni og sjóflutningi í 2009 í mun til 2008 eru lønirnar aftur vaksandi í hesum vinnum. Lønarútgjaldingar eru minkaðar serliga nógv innan bygging og privatar tænastuvinnur, síðan afturgongdin í búskapinum byrjaði á heysti 2008.

Arbeiðsloysið var vaksandi gjøgnum alt 2009 og fyrstu mánaðirnar av 2010. Í mai 2010 minkaði arbeiðsloysið fyri fyrstu ferð síðan november 2008 og var tá 5,8%, og er síðan gjøgnum árið lækkað, men orsakað húsaganginum í Faroe Seafood er arbeiðsloysið við árslok 2010 6,9%. Mett verður, at partur av fólkunum, ið mistu arbeiði hjá Faroe Seafood, verða aftur arbeiðsvirkin, nú vinnutólini eru seld nýggjum eigarum. Og saman við generellu uppgongdini í búskapinum verður sostatt roknað við, at gongdin við minkandi arbeiðsloysi heldur á fram í 2011.

Arbeiðsloysið í % av arbeiðsfjøld, 1. kvt 1998 til 4. kvt 2010 MYND 4.2




Kelda: Hagstova Føroya og OECD.

Flestu aðrir indikatorar hava víst væntaðu gongdina, men húsagangurin í Eik Banka og Faroe Seafood í seinnu hálvu av 2010 broyta fyritreytirnar nakað fyri framrokningarnar av 2010 og 2011. Í høvuðsheitum broyta fyritreytirnar ikki væntaða vøksturin hesi bæði árini samanlagt, men býtið yvir hesi bæði árini broytist, soleiðis at metingin fyri 2010 verður lækkað og metingin fyri 2011 verður hækkað.

### 4.2.2 Framrokning av BTÚ

Seinasta bráðfeingisuppgerð av BTÚ hjá Hagstovu Føroya fyri 2009 vísir nominella minking á 4,2%. Seinasta framrokning av BTÚ frá september í fjør vísti nominellan vøkstur á 2,9% í 2010 og 5,0% í 2011. Lønarframrokningin var 1,4% í 2010 og 4,5% í 2011. Metingar av ymsum indikatorum hava hildið sær, m.a. vísir endaliga mánaðarliga lønaruppgerðin fyri 2010 hjá Hagstovuni ein vøkstur á 1,7%.

Framrokningar av BTÚ og lønum fyri 2010, 2011 og 2012 MYND 4.3




Kelda: Landsbanki Føroya, meting t. 15. februar 2011

Fyri 2010 verður vøksturin framroknaður til 0,7%. Miðal árligi prísvøksturin í 2010 var sambært uppgerðini av prístalinum hjá Hagstovuni 0,4%. Hetta merkir, at føroyski búskapurin eftir reala afturgongd í 2009 aftur vaks í 2010, hóast vøksturin er lítil. Framrokningin fyri 2011 og 2012 vísir ein vøkstur á ávikavist 6,0% og 4,2%. Samanlagt eru sostatt framvegis tekin um, at afturgongdin í føroyska búskapinum, ið byrjaði í 2008 vendi til lítla framgongd í fjør, og at vøksturin heldur áfram í ár og í 2012.

Eftir lutfalsliga stóra afturgongd í privatu nýtsluni árini 2008 og 2009, verður mett, at privata nýtslan vaks í 2010 og heldur áfram at vaksa í ár og komandi ár. Metingar hjá

húsarhaldunum, smb. seinastu treystitalsuppgerðini um fíggjarligu útlitini í ár, vísa størri svartskygni sammett við fyri hálvum ári síðani. Húsagangirnir í Eik Banka og Faroe Seafood hava ivaleyst ávirkað treystitalið, men onnur lyklatøl benda á, at privata nýtslan er vaksandi, m.a. lutfallið millum mvg-inntøkur og lønarútgjaldingar.

Bruttotjóðarúrtøka í Føroyum 1998 til 2012, ársins prísir — MYND 4.4




Kelda: Hagstova Føroya (2003-2009) og Landsbanki Føroya (metingar fyri 2010, 2011 og 2012 t. 15. februar 2011).

Sambært almennum roknskapum hjá landi og kommunum vaks almenna nýtslan samanlagt uml. 2% í 2010, og fyri 2011 verður mett, at almenna nýtslan minkar nakað, men verður síðan javnað út í 2012.

Atgongd til fígging, rentulegan og búskaparútlitini eru avgerandi fyri hugin hjá privatum fyritøkum at gera íløgur. Privatar íløgur verða í framrokningini mettar at vaksa árini 2010, 2011 og 2012. Samlaðu almennu íløgurnar eru mettar at hava verið minkandi árini 2008 til 2010, men aftur vaksandi í 2011 í mun til 2010.

Útflutningurin av vørum minkaði uml. 6% í 2009, men øktist 12% í 2010. Væntað verður, at samlaði útflutningurin av vørum og tænastum veksur uml. 4% í 2011 og 2012.

Mett verður, at goymslurnar minkaðu heilt fitt í 2009 og 2010. Hetta hongur væntuliga saman við, at stórur partur av privata vinnulívinum hevði hall í 2009 og ávísar trupulleikar við rakstrinum í 2010. Fyritøkurnar hava tí tillagað sítt virksemi í 2009 og 2010, og ein partur av hesum tillagingum hevur verið at minka goymslurnar. Rakstrartrupulleikarnir og partar av tillagingunum hava drigið niður í búskaparvøksturin í 2010, sum teir eisini hava gjørt í 2009.

Ískoyti í prosentum hjá endaligari nýtslu til broytingar í BTÚ — TALVA 4.1

| *Árlig nominel %-broyting* | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| BTÚ | 3,0 | 2,9 | 12,9 | 5,9 | -0,8 | -4,2 | 0,7 | 6,0 | 4,2 |
| Privat nýtsla | 4,2 | 5,2 | 5,9 | 6,6 | -4,5 | -5,1 | 1,7 | 2,8 | 2,1 |
| Almenn nýtsla | 1,8 | 1,5 | 1,1 | 2,2 | 2,8 | 0,6 | 0,7 | -0,5 | 0,0 |
| Privatar íløgur og goymslubroytingar | -13,6 | 6,3 | 3,3 | 3,4 | -5,9 | -7,1 | -1,4 | 5,2 | 2,8 |
| Almennar íløgur | 1,5 | -0,8 | 1,4 | 0,8 | -0,5 | -1,0 | -1,0 | 0,4 | 0,0 |
| Nettoútflutningur | 9,1 | -9,4 | 1,1 | -7,2 | 7,4 | 8,4 | 0,8 | -1,9 | -0,7 |

Kelda: Hagstova Føroya (2003-2009) og Landsbanki Føroya (metingar fyri 2010, 2011 og 2012 t. 15. februar 2011).

Um privatu fyritøkurnar hava framt neyðugar tillagingar av rakstrinum í 2009 og 2010, skuldu tær fingið ein betri rakstur í 2011. Út frá hesum sjónarmiði verða goymslurnar ikki

broyttar so nógv í myndlinum fyri 2011 og 2012. Hesar báðar viðtøkur um betri rakstur og goymsluíløgur geva positivt ískoyti til vøksturin í 2011 og 2012.

Í talvu 4.1 sæst, í hvussu stóran mun ymsu partarnir av endaligu nýtsluni hava ávirkað BTÚ seinnu árini, umframt hvørja ávirkan ásetingarnar av fyritreytum hava á BTÚ-framrokningina fyri árini 2010 til 2012.

### 4.2.3 Altjóða búskaparútlit

Hóast heimsbúskapurin sum heild er komin á føtur aftur eftir altjóða búskaparkreppuna, eru framvegis trupulleikar við fíggjarligum ójavnum í bankaheiminum eins væl og hjá nógvum stjórnum. Hóast tað eru nærum fýra ár síðani fíggjarkreppan tók seg upp, er altjóða fíggjarliga støðufestið enn ikki fult endurbøtt, og týdningarmiklar politiskar avbjóðingar eru fyri framman. Lági vøksturin í teimum framkomnu búskapunum saman við fíggjarligum ójavnum, veksur um váðan í hesum londum. M.a. leggur ringa fíggjarstøðan í Evropa trýst á evropeiska lánsbrævamarknaðin. Harumframt er bruttoskuldin í privata geiranum í framkomnu londunum lutfalsliga lítið minkað seinasta árið.

IMF metir, at høga privata bruttoskuldin kann lækka um útlánshugin hjá fíggjarstovnum, ið eisini kann vera við til at tálma búskaparligu framgongdini. Ekspansivur peningapolitikkur við lágum rentum kann eggja til, at íløgur verða gjørdar, har váðin er stórur. Um búskaparvøksturin í framkomnu londunum heldur á at vera lágur, heldur arbeiðsloysið eisini á at vera høgt, og tá vera møguleikarnir fyri at lækka um almennu hallini og bruttoskuldina avmarkaðir. Lágur vøkstur ger tað torført at konsolidera, men evropeisku búskapirnir noyðast at fara undir konsolidering skjótast gjørligt, fyri at varðveita tamarhaldið á vaksandi skuld.

| Árligur realur BTÚ-vøkstur í %, 2009-2012 | | | | TALVA 4.2 |
|---|---|---|---|---|
| | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
| Heimsbúskapurin | -0,6 | 5,0 | 4,4 | 4,5 |
| USA | -2,6 | 2,8 | 3,0 | 2,7 |
| Týskland | -4,7 | 3,6 | 2,2 | 2,0 |
| Stóra Bretland | -4,9 | 1,7 | 2,0 | 2,3 |
| ES-londini | -4,1 | 1,8 | 1,7 | 2,0 |

Kelda: IMF World Economic Outlook Update, 25. januar 2011.

Hjá menningarlondum er stór tilgongd av fremmandum kapitali avgerandi fyri vøksturin, og hóast ávísir vandar kunnu fylgja kapitaltilgongdini, er niðurstøðan, at heimsbúskapurin soleiðis veksur við tveimum ymsum ferðum; hjá teimum framkomnu londunum gongur seint framá, meðan menningarlondini koma skjótt fyri seg. Mett verður, at heimsbúskapurin í miðal veksur uml. 4,5% næstu 2 árini.

## 4.3 GEIRARNIR Í BÚSKAPINUM

Her verður í stuttum tikið saman um geirarnar í búskapinum, ið verða hildnir at vera týðandi fyri gongdina í búskapinum og útlitini frameftir.

### 4.3.1 Tað almenna

#### *4.3.1.1 Landið*

Til 2008 virkaði landið konjunkturstimbrandi við skattalættum og stórum útreiðsluvøkstri, men í 2009 var stimbranin frá landinum minni eftir at serliga útreiðslur til keyp av vørum og tænastum og íløgurnar vórðu skornar. Hallið í landskassanum var tó størri í 2009 í mun til 2008 orsakað væl minni skatta- og avgjaldsinntøkur. Samlaðu rakstrarútreiðslur landskassans vóru 5.518 mió. kr. í 2009, 5.732 mió. kr. í 2010 og verða sambært fíggjarlógini fyri 2011 5.765 mió. kr.

Landskassaíløgurnar eru minkaðar árini 2008, 2009 og 2010, men økjast smb. fíggjarlógini fyri 2011 við uml. 70 mió. kr.

Landskassahallið var 688 mió. kr. í 2009 og verður væntandi uml. 700 mió. kr. í 2010, og smb. fíggjarlóg fyri 2011 verður hallið uml. 500 mió. kr. Sostatt heldur landið búskaparliga virkseminum og generella eftirspurninginum við stóra hallinum, men táttar í 2011 við at minka hallið.

Landskassahall seinnu árini hava økt landskassaskuldina munandi. Seinastu 2 árini er skuldin vaksin við 1,3 mia. kr., og bruttoskuldin var við árslok 2010 uml. 4,9 mia. kr. Við útbúnaði hevur landskassin tó framvegis nettoogn á uml. 450 mió. kr. Væntandi kemur landskassin at hava nettoskuld á uml. 100 mió. kr. við árslok 2011.

#### *4.3.1.2 Kommunurnar*

Undanfarnu árini hava kommunurnar vaksið bæði um rakstrar- og íløguútreiðslur, meðan flestu teirra nú í niðurgongd minka íløgurnar, og fleiri teirra minka eisini rakstrarútreiðslur. Kommunurnar undir einum virka tí konjunkturviðgangandi.

Kommunurnar fara sambært fyribils fíggjarætlanunum fyri 2011 at hava vøkstur í netto-útreiðslum á 1,9% í 2011 sammett við 2010, og skattainntøkur vaksa eftir ætlan við 3,6%. Nettoíløgurnar fyri 2011 vera umleið 324 mió. kr., ið er á áleið sama stigi sum árið fyri. Samlaða hallið hjá kommununum verður eftir fyriliggjandi fíggjarætlanum í 2011 uml. 50 mió. kr. sammett við hall á uml. 90 mió. kr. í 2010. Nettoskuldin hjá kommununum er tilsamans uml. 830 mió. kr. við árslok 2010 og veksur tilsvarandi hallinum í ár.

Kommunurnar hava samanlagt lítla tálmandi til nevtrala ávirkan á konjunkturgongdina í 2011. Tórshavnar kommuna er nógv tann størsta kommunan, og hon er væl fyri fíggjarliga og skal eftir ætlan fremja íløgur fyri uml. 132 mió. kr. í 2011 í m.a. ellisheim. Hetta virkar stimbrandi á búskapin.

Av tí at kommunurnar eru so ymiskt fyri fíggjarliga og hava so ymiska skuldarbyrðu at dragast við, verður tað ein stór avbjóðing at fremja fyriskipanir, sum bæði hava fyrilit fyri landsins stýringartørvi sum heild og fyri tørvinum í teimum einstøku kommununum.

#### 4.3.1.3 Sosialu grunnarnir

Arbeiðsloysisskipanin virkar útjavnandi í konjunkturgongdini og stimbrar virksemið nú framleiðslan er undir vanligum stigi. ALS hevur í løtuni eina eginogn á uml. 600 mió. kr., og við verandi arbeiðsloysi verða útgoldnar uml. 25 mió. kr. í arbeiðsloysisstuðli um mánaðin. Við væntandi minni arbeiðsloysi gjøgnum árið, kann samlaða útgjaldið í 2011 koma at tátta í 250 mió. kr. Inngjaldið er uml. 100 mió. kr. árliga, men skipanin er fíggjarliga væl fyri og ment at standa ímóti fleiri árum við lutfalsliga høgum arbeiðsloysi.

Vøksturin í útgjøldum styrkir um keypsorkuna hjá arbeiðsleysum, minkar um óttan fyri at gerast arbeiðsleysur og fær væntandi ta ávirkan, at húsarhaldini økja minni um uppsparingina, enn tey annars høvdu gjørt.

AMEG, Barsilsskipanin og Heilsutrygd eru stovnar, ið gjalda nøkulunda tað sama út, sum kemur inn, og ávirka tí ikki samlaða búskapin í sama mun sum ALS.

### 4.3.2 Húsarhaldini

Føroysk húsarhald eru sum heild ikki illa fyri sammett við húsarhald í flestu øðrum londum. Lántøkan hjá húsarhaldum í Føroyum er um 75% av BTÚ, sum er tætt við miðal í altjóða sammeting. Húsarhald í Danmark, Sveis, Stórabretlandi og USA hava lántøku á millum 90 og 120% av BTÚ. Lántøkan hjá húsarhaldum í Italia, Fraklandi, Týsklandi og Japan er hinvegin nakað lægri millum 40 og 60% av BTÚ.

Virðisbroytingar í fíggjarkreppuni — MYND 4.5




Kelda: Landsbanki Føroya, Eik Banki og VP.

Marknaðarvirðið á skrásettum partabrøvum[34] á VP (Værdipapircentralen), sum føroyingar eiga, harav húsarhaldini ivaleyst eiga ein minni part, er minkað úr uml. 7,5 mia. kr. á sumri 2007 til undir uml. 900 mió. kr. við endan av 2010. Størri parturin av minkingini stavar frá kurstapum, meðan ein minni partur stavar frá, at føroyingar hava selt burturav til útlendingar. Bústaðarprísirnir vóru í hæddini á heysti 2007, fullu síðan næstu 2 árini, men eru hækkaðir seinasta árið. Samlaða bústaðarvirðið er fallið við uml. 3,5 mia. kr. eftir trimum árum.

[34] Her er talan um føroysku skrásettu partabrøvini hjá BankNordik, Atlantic Petroleum, Atlantic Airways og Eik Bank í Værdipapircentralen (VP). Eik Banka partabrævið er strikað í skrásetingini síðan oktober 2010. Bakkafrost og Faroe Petroleum eru ikki við í hesum tølum.

Gongd í lønum og MVG, jan-98 til jan-11 MYND 4.6




Kelda: Hagstova Føroya og TAKS.

Smb. lutfallinum mvg/lønir, sí mynd 4.6, hava húsarhaldini minkað lutfalsliga nógv um nýtsluna frá heysti 2007 til vár 2010, men seinastu hagtølini benda á vaksandi nýtslulutfall. Innflutningstølini fyri drúgvar og hálvdrúgvar vørur benda á sama borðið.

Seinasta treystikanningin av føroyskum húsarhaldum vísir, at húsarhaldini í januar hava generelt verri vánir til persónligu fíggjarligu viðurskiftini og generellu búskaparstøðuna næstu 12 mánaðirnar sammett við fyri hálvum ári síðan. Henda myndin er ikki óvæntað og ivaleyst ávirkað av støðuni í Eik Banka og Faroe Seafood.

Útgjaldið úr arbeiðsloysisskipanini er eftir lógarbroyting í 2009 vaksið munandi. Hetta saman við, at arbeiðsloysi eisini er í grannalondunum, kann hugsast at gera, at fráflytingin verður minni enn hon annars hevði verið. Bæði minni fráflyting, sum gevur fleiri brúkarar, og hægri arbeiðsloysisstuðul mótvirka minking í nýtsluni.

Eftir at nýtslan síðan á heysti 2007 er fallin, eru greið tekin um nýtsluvøkstur, ið enn ikki er komin á eitt stig, sum vanliga verður roknað sum miðal.

### 4.3.3 Tilfeingisvinnurnar

Til ber at býta tilfeingisvinnurnar í fýra bólkar, ið allir virka undir ymsum fyritreytum til ymsar tíðir. Tilfeingisvinnurnar kunnu verða býttar í botnfiskiveiði undir Føroyum, botnfiskiveiði á fjarleiðum, fiskiveiði eftir uppsjóvarfiski og alivinnu.

#### *4.3.3.1 Botnfiskiveiði undir Føroyum*

Fiskiskapurin eftir toski er batnaður nakað síðsta árið, men fiskiskapurin eftir hýsu og upsa er framvegis ógvuliga vánaligur. Hýsustovnurin er søguliga illa fyri, og fiskiskapurin eftir upsa hevur verið sera vánaligur síðsta hálva árið ella so. Orsøkirnar til vánaliga fiskiskapin eftir upsa eru ikki heilt greiðar, men stovnurin hevur verið hart troyttur í fleiri ár, og veiðitrýstið hevur verið ov høgt. Hetta er óivað ein orsøk til vánaliga fiskiskapin nú.

Indikatorar fyri føroyskan fiskiskap, jan-03 til jan-11 MYND 4.7




Kelda: Hagstova Føroya.

Heildarveiðan eftir botnfiski undir Føroyum er framvegis ógvuliga lítil sammett við søgulig tøl. Í 2010 vórðu avreidd umleið 14 tús. tons av toski sammett við eina miðalveiði á uml. 23 tús. tons síðani 1961. Avreiðingar av hýsu vóru uml. 5 tús. tons í 2010 sammett við eina miðalveiði á uml. 17 tús. tons síðani 1957. Av upsa vórðu avreidd uml. 40 tús. tons í 2010, sum er tætt við miðalveiðina síðani 1961. Seinasta ársfjórðing av 2010 og í byrjanini av 2011 hevur, sum nevnt omanfyri, fiskiskapurin eftir upsa verið vánaligur.

Fiskaprísir vóru sera lágir meginpartin av 2009, men prísirnir eru hækkaðir aftur og eru aftur tætt við teir miðalprísir, sum hava verið seinastu 4-5 árini. Oljuprísir eru hækkaðir nógv í 2010 og í byrjanini av 2011, og hetta ávirkar raksturin nógv hjá ávísum skipabólkum (serliga hjá trolaraflotanum). Nógv minkandi framleiðslan í hesum partinum av flotanum síðstu árini stavar fyrst og fremst frá, at fiskastovnar hava verið alt ov hart troyttir undanfarin ár, samstundis sum gróðrarlíkindi undir Føroyum og tilgongd hava verið undir miðal. Toska- og hýsustovnurin eru framvegis ógvuliga illa fyri, og gýtingarstovnarnir eru søguliga smáir.

Sambært fiskifrøðingum eru útlit til betri fiskiskap eftir toski næstu árini, m.a. tí at nakrir hampiliga góðir árgangir eru ávegis í stovnarnar. Fyri veiðina eftir hýsu eru útlitini framvegis ikki serliga góð. Talið á fiskiførum í heimligu fiskivinnuni er minkað síðstu árini, m.a. orsakað av, at raksturin hevur verið so vánaligur, at tað hevur verið neyðugt at tillaga bygnaðin í fiskivinnuni. Útlit eru til, at hetta kann geva ein betri rakstur og hægri framleiðslu næstu árini. Harafturat kemur, at fiskavirkisvinnan á landi verður umskipað í løtuni, sum eisini, um framleiðslukapasiteturin betri verður lagaður til rávørugrundarlagið, sum er undir Føroyum, kann hava við sær eina meira lønandi fiskivinnu og hægri framleiðslu í framtíðini.

### *4.3.3.2 Botnfiskiveiði á fjarleiðum*

Orsakað av ósemjuni millum strandalondini um makrelfiskiskapin, verður eingin fiskiskapur hjá føroyskum skipum í norska partinum av Barentshavinum í ár. Vinnan sjálv metir, at hetta minkar veiðivirðið uml. 30%. Sæð burtur frá hesum, eru útlitini ikki broytt stórvegis síðan síðstu meting. Føroysku kvoturnar í russiskum sjógvi verða tær somu í 2011 sum í 2010. Harafturat verða kvoturnar av toski á Flemish Cap tvífaldaðar, soleiðis at føroyska kvotan av toski har er 2.200 tons í 2011.

Royndin eftir toski og hýsu í Barentshavinum er sambært ICES á burðardyggum stigi, og útlitini fyri henda fiskiskapin eru støðug frameftir. Framleiðslan tilsamans í hesum partinum av flotanum verður mest sannlíkt nakað minni komandi tvey árini, men kann síðani koma á umleið sama stig aftur við tí fyrivarni, at samstarvið millum strandalondini um fiskivinnuavtalur kemur í rættlag aftur.

#### *4.3.3.3 Uppsjóvarvinna*

Uppsjóvarskipini ávirkast sjálvsagt av ósemjuni millum strandalondini um makrelfiskiskapin og í øðrum lagi av, at heildarkvotan av svartkjafti minkar 93% og at heildarkvotan av norðhavssild minkar 33% í 2011. Føroyska svartkjaftakvotan verður uml. 10 tús. tons, meðan kvotan av norðhavssild verður uml. 51 tús. tons.

Makrelkvotan í føroyskum sjógvi, og føroyska kvotan eftir lodnu í semjuni millum Ísland og Føroyar gera, at veiðivirðið tilsamans ikki ávirkast so nógv. Harafturat kemur, at ein størri partur av veiðini verður avreiddur til matna, soleiðis at prísirnir í miðal yvirhøvur eru hækkandi. Samanumtikið er kortini væntandi, at framleiðslan í hesum partinum av flotanum verður nakað lægri í 2011 sammett við undanfarin ár.

#### 4.3.3.4 Alivinna

Útlitini fyri hægri framleiðslu næstu árini í alivinnuni eru góð. Tøkan verður av vinnuni mett til umleið 60 tús. tons í 2011, meðan hon var góð 47 tús. tons í 2010. Útsetingin næstu 2-3 árini verður meiri sammett við undanfarin ár, so tøkan fer væntandi at verða umleið 60-70 tús. tons næstu 2-3 árini. Prísirnir á alifiski eru sum kunnugt høgir í løtuni, og tað er óvist, hvussu leingi verandi prísir vera á marknaðinum. Hetta er m.a. treytað av, hvussu nógv verður útflutt av alifiski úr Kili. Við verandi prísum á alifiski var útflutningsvirðið umleið 1,4 mia. kr. í 2010, og útflutningsvirðið kann blíva umleið 1,7 mia. kr. í 2011 við verandi prísum.

Indikatorar fyri alivinnuna, jan-03 til jan-11 MYND 4.8




Kelda: Hagstova Føroya.

#### *4.3.3.5 Samanumtikið um tilfeingisvinnurnar*

Samanumtikið eru tekin um, at framleiðslan verður nakað meiri í 2011 og í 2012 sammett við 2010. Óvissur eru sjálvsagt knýttar at hesum. M.a. kann oljuprísurin vaksa meira enn væntað. Við nevnda fyrivarni er mest sannlíkt, at framleiðslan í tilfeingisvinnunum verður hægri næstu 1-2 árini, og at hetta fer at hava eitt ískoyti til vøkstur í BTÚ við sær.

### 4.3.4 Fíggjargeirin

Rembingar vóru í føroyska fíggjargeiranum í 2010 eftir at Eik-samtakið fór á húsagang og Finansiel Stabilitet yvirtók bankan. Bankin er síðan skildur sundur í ein føroyskan og ein danskan part, har 70% av partabrøvunum í føroyska partinum eru seld TF-Holding.

Húsagangurin og leisturin, sum Finansiel Stabilitet arbeiddi eftir í tíðarskeiðinum at fáa selt bankan á aðrar hendur, legði ávísar avmarkingar á útlánsvirksemi bankans. Húsarhald og vinnulív við tørvi á fígging hava antin verið noydd at sligið seg til tols ella leita sær fígging í øðrum føroyskum peningastovnum. Hagtøl fyri inn- og útlánsvirksemi vísa, at húsarhald og vinnulív í fíggjarkreppuni hava minkað nýtsluna lutfalsliga og økt uppsparingina, og mett verður, at órógvið eftir húsagangin hevur avmarkað ein frammanundan lutfalsliga lítlan eftirspurning eftir fígging. Húsagangurin kom sostatt í eini tíð, har eftirspurningurin eftir fígging var avmarkaður, og mett verður, at beinleiðis negativa ávirkanin á búskaparliga virksemið av hesum ávum hevur verið avmarkað.

Nú Eik Banki er rekapitaliseraður og hevur fingið nýggjar eigarar, kemur føroyski fíggjarmarknaðurin helst at virka á sama hátt sum undan húsaganginum. Útlánsvirksemið hjá Eik Banka verður sannlíkt merkt av einum heldur varligari útlánspolitikki komandi árini, um samanborið verður við tíðarskeiðið undan fíggjarkreppuni. Hetta er bert tekin um, at bankavirksemið kemur aftur í eina vanliga legu. Føroyingar hava tapt rættuliga stórar upphæddir uppá partabrøv seinastu árini og Eik-húsagangurin kennist eisini sum ringur smeitur hjá nógvum húsarhaldum og fyritøkum.

Eitt vælvirkandi fígggjarkervi er til reiðar at fíggja verkætlanir, ið sannlíkt kasta vinning av sær við tíðini. Um fígging ikki verður givin til slíkar verkætlanir verður tosað um eina møguliga *kredittklemmu*. Mett verður ikki, at nøkur kredittklemma eyðkennir føroyska fíggjargeiran í løtuni. Hinvegin er eftirspurningurin eftir fígging lutfalsliga lítil, og hetta tálmar útlánsvirkseminum hjá bankunum nakað.

Eftirspurningurin eftir fígging er eisini nær tengdur at framtíðar útlitum. Um fyritøkur og húsarhald stúra fyri framtíðini og vænta lágan vøkstur og høgt arbeiðsloysi, tálmar hetta eftirspurninginum eftir fígging.

Rentustigið ávirkar eftirspurningin eftir fígging. Tjóðbankarenturnar í Evropa eru í løtuni metlágar, eisini tann hjá Danska Tjóðbankanum, men útlánsrentan hjá føroysku peningastovninum er ikki lækkað í tráð við, at tjóðbankarentan er lækka. Torført er at gera upp rentustig og rentumun í føroysku bankunum tí neyðuga taltilfarið er ikki tøkt, men ábendingar eru um at stigið er í hægra lagi.

1.okt. 2010 fór Bankapakki 1 úr gildi og við hesum eisini tann generella ríkistrygdin, sum tryggjaði alt innistandandi í bankunum. Serstøk innlán (t.d. pensjónir og barnauppsparing) hava framvegis fulla trygging eftir 1. oktober, men fyri vanlig innlán er trygdin nú 100.000 evrur netto. Danska stjórnin vildi við Bankapakka 2 tryggja, at ríkiligt av gjaldføri var í danska fíggjargeiranum. Peningastovnar fingu møguleika at søkja um sokallað *individuelt statsgaranti*, t.v.s. peningastovnar við ríkistrygd fingu møguleika at læna pening á lánsbrævamarknaðinum. Eik Banki, BankNordik og Norðoya Sparikassi fingu allir tillutað hesa trygdina og lántu lutfalsliga stórar upphæddir. Hendan trygdin er tó bert galdandi til á sumri 2013.

Um lánsmarknaðirnir í Evropa til ta tíð ivast í at lata fígging til peningastovnar, kann tað gerast torført hjá fleiri bankum at endurfíggja skuld, sum fellur til gjaldingar eftir juli 2013. Um hetta gerst støðan er sannlíkt at útlánsvirksemið verður skert.

### 4.3.5 Aðrar vinnur

Hetta eru framleiðslu- og tænastuvinnur, sum ikki eru nevndar omanfyri, men sum til samans eru stórur partur av virðisøkingini í føroyska búskapinum.

#### *4.3.5.1 Fiskavirking*

Fiskavirkisvinnan á landi hevur í fleiri ár havt sera trupult at fáa lønsemi í raksturin. Tað eru fyrst og fremst tey stóru virkini, sum hava givið hall, meðan smærru virkini sum heild hava havt lønandi rakstur. Stórar broytingar hava seinastu tíðina verið at sæð í fiskavirkisvinnuni, og í sambandi við viðgerðina av búnum eftir P/F Faroe Seafood verður fiskavirkisvinnan eisini umskipað. Verður framleiðslukapasiteturin lagaður betur til tað rávørugrundarlag, sum er undir Føroyum, eru útlit til, at henda vinnan kann gerast meira lønandi og kasta meira av sær frameftir.

Indikatorar fyri fiskavirkisvinnuna, jan-03 til jan-11 MYND 4.9




Kelda: Hagstova Føroya.

Enn er trupult at gera metingar um framleiðsluna í 2011 og lutvíst eisini í 2012, men tað eru tekin um, at umskipanir í framleiðsluni vera til frama fyri framleiðsluna hereftir. Fiskaframleiðslan hevur verið lág í desember og januar við tí úrsliti, at arbeiðsloysið hevur verið stórt. Sáttmálar eru nú gjørdir millum manningarfeløg og flestu skipabólkar við møguleika fyri heldur betri rakstri hjá útsettum skipabólkum. Fýra virkir og seks skip eru nú seld burtur úr búnum eftir Faroe Seafood. M.a. hetta styrkir útlitini til, at framleiðslan kann gerast effektivari og hægri frameftir.

#### *4.3.5.2 Byggivinnan*

Virksemið í byggivinnuni er minkað nógv seinastu 2-3 árini, men tað tykist framvegis vera nóg mikið av arbeiði til stóru fyritøkurnar í byggivinnuni. Vanligt húsasmíð er minkað nógv, og hetta ávirkar virksemið hjá serliga smærri fyritøkum innan húsasmíð, men tað eru framvegis nógvar aðrar verkætlanir í gongd, m.a. bygging av raðhúsum og íbúðum umframt almennar verkætlanir í miðstaðarøkinum og aðrastaðni.

Hetta merkir, at stórar og miðalstórar fyritøkur í byggivinnuni yvirhøvur hava nóg mikið av arbeiði í øllum førum eitt ár ella hálvtannað árið frameftir. Vónirnar í vinnuni eru nakað

tær somu sum við seinastu meting, og broyttu fyritreytirnar gera framvegis sína ávirkan galdandi frá støðuni fyri fáum árum síðan. Minkingin í virkseminum í byggivinnuni sæst greidliga aftur í, at lønargjaldingarnar tilsamans eru minkaðar umleið 24% síðani á sumri 2008, og talið á løntakarum er minkað umleið 28%, sí mynd 4.10.

Indikatorar fyri byggivinnuna, jan-03 til jan-11 MYND 4.10




Kelda: Hagstova Føroya.

Fleiri almennar verkætlanir og arbeiði eru fráboðað, sum eru byrjað, meðan onnur arbeiði byrja seinni í 2011 og í 2012. Av størri verkætlanum kunnu nevnast at leingja flogvøllin, miðnámsskúli í Marknagili, útbyggingarnar av vatnorku hjá SEV og Leirvíkarvegurin. Harafturat hevur Tórshavnar kommuna ætlanir um at fara undir fleiri verkætlanir, harav nakrar eru byrjaðar, umframt at Landsverk ætlandi fer undir nakrar smærri vegagerðir. Effektiviteturin í byggivinnuni kann vaksa næstu árini, vera byggifyritøkur størri og hava neyðuga umsitingarførleikan. Væntandi vera eisini størri eindir at síggja í byggivinnuni. Serliga tá hugsað verður um, at kappingin frá útlendskum byggifyritøkum harðnar.

### *4.3.5.3 Handils- og tænastuvinnurnar*

Privata nýtslan og eftirspurningurin eftir vørum og tænastum eru framvegis lág sammett við søgulig tøl. Hetta ávirkar sjálvsagt handils- og tænastuvinnur. Tað er serliga sølan av drúgvum nýtsluvørum og ymsum tænastuveitingum, sum er minkað nógv, meðan sølan av ódrúgvum nýtsluvørum ikki er minkað líka nógv.

Indikatorar fyri handil og tænastuvinnur, jan-03 til jan-11 MYND 4.11




Kelda: Hagstova Føroya.

At døma eftir MVG-tølunum er privata nýtslan við at hækka aftur, men tó á eina legu, sum er lægri enn miðallegan, sum hevur verið síðstu nógvu árini. Tekin eru um, at goymslurnar

fara ikki at minka meira, og íløgurnar kunnu hugsast at fara at vaksa nakað. Eftir konjunkturbarometrinum at døma eru vánirnar bjartari enn áður. Hetta stuðlar undir heildarmetingina, at búskapurin hevur møguleika at vaksa í nøkur ár.

### 4.3.6 Útlond

Sambært nýggjastu uppgerðum av inn- og útflutningi av vørum var avlop á handilsjavnanum á umleið 250 mió. kr. í 2010 sammett við hall á umleið 100 mió. kr. í 2009. Munurin stavar frá meiri útflutningi av uppsjóvarfiski eins og meira av botn- og alifiski varð útflutt. Innflutningurin vaks eisini í 2010 sammett við 2009, sum stavar mest frá hægri oljuprísum. Árini frammanundan hetta, tá ið húsarhaldsnýtslan vaks í stórum árini 2005 til 2007, vóru stór hall á handilsjavnanum, sí mynd 4.12.

Handilsjavnin - inn- og útflutningur av vørum, jan-05 til des-10 — MYND 4.12




Viðm.: Innflutningur og útflutningur byggja á 12 mánaðar rullandi sum.
Kelda: Hagstova Føroya.

Umframt handilsjavnan fevnir gjaldsjavnin um handil av tænastum og um flytingar í útlond og úr útlondum. Óvissan er stór í uppgerðum viðvíkjandi føroyska gjaldsjavnanum, og tølini skulu tí verða lisin við fyrivarni. Mynd 4.13 vísir gjaldsjavnan síðstu árini. Handilsjavnin bendir á, at hampiliga stórt avlop verður aftur á gjaldsjavnanum í 2010 og mest sannlíkt í 2011 eisini.

Rakstrarviðskifti gjaldsjavnans, 1998-2009 — MYND 4.13




Kelda: Hagstova Føroya (1998-2008) og Landsbanki Føroya (2009-2010).

# ORÐALISTI

Orðalistin er ein lýsing av nøkrum av búskaparligu hugtøkunum, sum eru nýtt í frágreiðingini.

Arbeiðsfjøld
Tey, sum hava arbeiði, og tey, sum eru arbeiðsleys samantald.

Arbeiðsleys
Tey, sum eru arbeiðsleys, men sum eru tøk á arbeiðsmarknaðinum og leita eftir arbeiði og sostatt eru partur av arbeiðsfjøldini.

Arbeiðsloysi
Arbeiðsleys í % av arbeiðsfjøldini.

Avreiðingar
feskfiskiveiðan (av botnfiski og øðrum fiski) skrásett um avreiðingarskipanina. Mátað í virði ella í nøgd.

Bruttotjóðarúrtøka
Er eitt mát fyri alla inntøkuna, ið er skapað í einum landi ella búskapi ávíst tíðarskeið. Verður ofta mett at vera høvuðsmátið fyri búskaparligt virksemi. BTÚ er ikki fullkomið mát fyri inntøku ella framleiðslu í einum landi. T.d. leggur tað ikki upp fyri sliti av tilfeingi (náttúru- ella øðrum tilfeingi) ella útbúnaði. Eisini roynir BTÚ at máta allar vørur og tænastur til ein *marknaðarprís*, hóast allar vørur og tænastur ikki hava ein marknaðarprís, t.d. skúla- og heilsutænastur.

Catch control rule (veiðisetningur) Reglugerð fyri, hvussu nógv loyvt ella ráðiligt er at fiska úr fiskastovnum í mun til stovnsstøddina, gýtingarstovn, tilgongd til stovnin eina ávísa tíð o.tíl.

Eftirspurningur
Nøgdin av vørum og tænastum húsarhald, vinnan, tað almenna og umheimurin vilja keypa.

Fiskiloyvi
Eitt fiskiloyvi er tann rættur, sum landsstýrismaðurin letur eigara av ávísum fiskifari, sum hevur veiðiloyvi, at veiða ávíst fiskidagatal og/ella ávísa nøgd úr ávísum fiskastovnum á ávísum leiðum í ávísum fiskiári.

Fíggjarpolitikkur
Búskaparpolitisk tiltøk, ið hava sum endamál at stýra og minka búskaparlig sveiggj. Skilt verður vanliga millum at reka *virknan fíggjarpolitik* og at brúka *automatiskar stabilisatorar.*

Framleiðsla
Nýtsla av tilfeingi og útbúnaði at framleiða vørur og tænastur sum hava virði. Virðið á framleiðslu verður mátað í føstum prísum, t.e. eftir vanligan prísvøkstur.

Framleiðni (produktivitetur)
Virðisøking fyri hvørja eind av tilfeingi nýtt í framleiðsluni (t.d. fyri hvørja eind av arbeiðsmegi).Framleiðni verður roknað realt, t.e. í føstum prísum ella frároknað vanligan prísvøkstur.

Gjaldsjavni
Hagfrøðilig uppgerð ið tekur samanum allar búskaparligar flytingar hjá einum landi við umheimin eitt ávíst tíðarskeið og mátað í sama gjaldoyra. Mest nýtta konta í gjaldsjavnanum er *rakstrarviðskifti gjaldsjavnans* (á enskum *current account*), ið fevnir um vøruflytingar og tænastuflytingar umframt lønar- og inntøkuflytingar millum íbúgvarnar í einum landi og umheimin.

Gýtingarstovnur
Samlaða tonsatalið á øllum fiskum, sum eru kynsbúnir. Fyri tosk á Landgrunninum er tað, tá toskurin er 3-4 ára gamal og eldri.

Handilsjavni
Virðið á uttanlandshandli (t.e. inn- og útflutningi) av vørum hjá einum landi við umheimin. Mátað í sama gjaldoyra og eitt ávíst tíðarskeið. Javnin verður ofta uppgjørdur sum útflutningur minus innflutningur (t.e. nettoútflutningur).

IMF
Altjóða Gjaldoyragrunnurin (International Monetary Fund, Washington). Stovnaður 27. desember 1945 við Bretton Woods-avtaluni.

Javni (fíggjarstøða, balansi)
Uppgerð av heildarvirðinum á fíggjarligum ognum og skyldum hjá eini fyritøku (ella einum húsarhaldi), mátað eina ávísa tíð, t.d. seinast í einum fíggjarári.

Konjunkturar
Stutttíðarsveiggj í búskaparligari framleiðslu og í arbeiðsloysi samsvarandi høvuðsgongdini yvir longri tíð.

Kredittvirði
Evnini hjá einum lántakara at rinda einum lánveitara lán aftur eftir lánitreytunum. Verður oftast mátað sum sannlíkindini, at ein lántakari fer at rinda lánið aftur eftir lánitreytunum. Kredittvirðið er avgerandi fyri, hvørja rentu og hvørjar treytir ein lántakari kann læna pening fyri.

Nettotilflyting
Tilfutt fólk frádrigið fráflutt fólk. Talan er um nettotilflyting, eru tilflutt fólk fleiri enn fráflutt.

Recovery plan Ætlan sum orðar eina mannagongd og tilskilar kravd stig fyri at verja stovnar, um fiskastovnar gerast somikið smáir og illa fyri, at vandi er fyri, at teir ikki megna at endurnýggja seg.

Rentumunur
Munurin millum inn- og útlánsrenturnar hjá peninga- og fíggjarstovnum í miðal. Rentumunurin er týdningarmesta inntøkukeldan hjá peninga- og fíggjarstovnum. Eisini kallað rentumarginalur.

Skattur og avgjøld
Kravd gjøld til tað almenna uttan nakra ávísa ella serliga mótveiting frá tí almenna.

Skuld
Upphædd sum búskaparlig eind (t.d. fyritøka, persónur ella land) skyldar aðrari búskaparligari eind.

Sosialir grunnar
Arbeiðsloysisskipanin (eisini kallað ALS), Samhaldsfasti Arbeiðsmarknaðareftirlønar-grunnurin (eisini kallaðar, AMEG, SAMEG ella AMG), Barsilsskipanin og sjúkrakassarnir.

Stovnsstødd
Samlaða tonsatalið á øllum fiskum í einum ávísum stovni, sum svimja í havinum til eina ávísa tíð, t.d. á toskinum á Landgrunninum í 2009. Í praksis vil tað siga fiskur, sum er 2 ár og eldri.

Tað almenna
Landið (landskassin), kommunurnar, sosialir grunnar, ríkisfyrisitingin, almenn og kommunal partafeløg.

Tilgongd
Tal á smáfiski, sum júst er vorðin 2 ára gamal, og harvið er vorðin ein partur av toskastovninum.

Uppsparing
Munurin millum inntøku og nýtslu hjá ávísari búskaparligari eind (t.d. einum húsarhaldi ella eini fyritøku).

Útboð
Vørunøgdin til samans og tænastur, ið eru tøk hjá húsarhaldum, vinnuni, tí almenna og umheiminum at keypa.

Veiðiloyvi
Veiðiloyvi er góðkenning, ið landsstýrismaðurin veitir ávísum fiskifari at veiða á føroysku landleiðunum og á leiðum uttan fyri føroysku landleiðirnar.

Virðisøking
Munurin á virðinum á framleiðsluni og virðinum á nýtslu í framleiðsluni. T.e. tað virðið, ið verður lagt aftrat virðinum á nýtsluni (t.d. rávøru) við góðsking í framleiðsluni.

Vøru- og tænastujavni
Fevnir umframt um handilsjavnan um uttanlandshandil av tænastum hjá einum landi við umheimin, t.d. skipaflutningur, flogferðsla og aðrar tænastur. Mátað í sama gjaldoyra og eitt ávíst tíðarskeið.

# BÓKMENTIR

[1] J.R. Baldwin og W. Gu. Competition, Firm Turnover and Productivity Growth. Economic Analysis Research Paper Series No. 42, Statistics Canada. Frágreiðing tøk á www.statcan.gc.ca/pub/, 2006.

[2] Búskaparráðið. Búskaparfrágreiðing heystið 2010. Frágreiðing tøk á www.buskap.fo, oktober 2010.

[3] Búskaparráðið. Búskaparráðið Várið 2000. Frágreiðing tøk á www.buskap.fo, januar 2000.

[4] De Økonomiske Råd. Dansk Økonomi, efterår 2010. Frágreiðing tøk á http://www.dors.dk/sw7756.asp, oktober 2010.

[5] Fiskidaganevndin. Tilmæli frá Fiskidaganevndini til landsstýrismannin í fiskivinnumálum fyri fiskiárið 2010/2011. Tilmæli um áseting av fiskidagatali tøkt á http://www.fisk.fo/Default.aspx?ID=2402&M=News&PID=7032&NewsID=3124, juni 2010.

[6] Fiskeriets økonomi 2010. Fødevareøkonomisk Institut. Københavns Universitet. Frágreiðing tøk á http://www.foi.life.ku.dk/Publikationer/FOI_serier/fiskeriets_okonomi.aspx, København 2010.

[7] Hjalmar Hansen og Hjalti í Jákupsstovu. Loyvisskipan í føroysku fiskivinnuni eftir 2018. Frágreiðing latin Jacob Vestergaard, landsstýrismanni í fiskivinnumálum. Frágreiðing tøk á http://www.fisk.fo/Default.aspx?ID=2402&M=News&PID=7032&NewsID=3187, juli 2010.

[8] Havstovan. Tilmælið fyri fiskiárið 2010/2011. Tilmæli um áseting av fiskidagatali tøkt á www.frs.fo, 2010.

[9] Jákup í Jákupsstovu. Fiskimenninir. Serprent úr fiskimannablaðnum. Tórshavn, 1968.

[10] ICES. Report of the North-Western Working Group. ICES CM 2010/ACOM:07., www.ices.dk/iceswork/workinggroups.asp og vel 'North-Western Working Group'. Keypmannahavn, 2010.

[11] IMF. World Economic Outlook. Frágreiðing tøk á www.imf.org/weo, oktober 2010.

[12] Konkurrencestyrelsen. Konkurrence – vækst og velfærd. Konkurrenceanalyse 01/2009. Frágreiðing tøk á www.konkurrencestyrelsen.dk, 2009.

[13] Patrick Love. Fisheries: While Stocks Last? OECD Insights. OECD Publishing. Tøkt á www.oecd.org, 2010.

[14] NOTA. Roknskapargreining av fiskiflotanum 2005 til 2009, november 2010.

[15] NOTA. Roknskapargreining av flakavirkjum 2005 til 2009, november 2010.

[16] Jákup Reinert. Fundir í ráðgevandi nevndini (ACOM) hjá Altjóða Havrannsóknarstovninum (ICES) í mai/juni 2010. HAV smárit 10/07, tøkt á http://www.frs.fo, 2010.

[17] Óli Samró, Heri Joensen og Sunniva Joensen. Útlendskur kapitalpartur í føroyskum fiskiskipum. Frágreiðing handað Jacob Vestergaard, landsstýrismanni í fiskivinnumálum. http://www.fisk.fo/Default.aspx?ID=2402&M=News&PID=7032&NewsID=3187, februar 2010.

[18] Petur Steingrund. The near-collapse of the Faroe Plateau cod (Gadus morhua L.) stock in the 1990s: The effect of food availability on spatial distribution, recruitment, natural production and fishery. Doktararitgerð um føroyskan tosk, tøk á http://hdl.handle.net/1956/3697, oktober 2009.

[19] U. Rashid Sumaila. A Cautionary Note on Individual Transferable Quotas. Frágreiðing tøk á http://www.ecologyandsociety.org/vol15/iss3/art36/ES-2010-3391.pdf. Ecology and Society 15(3): 36, 2010.

[20] Jens Helgi Toftum og Rúna Guttesen. Brúksskylda til fiskirættindi. Frágreiðing tøk á http://www.fisk.fo/Default.aspx?ID=2402&M=News&PID=7032&NewsID=3187. Frágreiðing til landsstýrismannin í fiskivinnumálum, februar 2010.

[21] Jens Helgi Toftum og Rúna Guttesen. Umsetilig fiskirættindi. Frágreiðing tøk á http://www.fisk.fo/Default.aspx?ID=2402&M=News&PID=7032&NewsID=3187. Frágreiðing til landsstýrismannin í fiskivinnumálum, februar 2010.